LØGTINGSINS
UMBOÐSMAÐUR

# Ársfrágreiðingin

2023



LØGTINGSINS
UMBOÐSMAÐUR

*Løgtingsins umboðsmaður*
**Ársfrágreiðingin 2023**
© 2023 Løgtingsins umboðsmaður
Umbróting, prent og innbinding: Prentstovan.fo
Myndir: Miriam & Janus Photography, Faroephoto

ISBN 978-99918-891-3-9

NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI
Svanamerktur prentlutur 5041 0826

# Innihaldsyvirlit


1) Um embætið ... **8**

2) Gongdin í 2023 ... **11**

3) Hagtøl ... **14**

4) Álit ... **28**

5) Frágreiðingar ... **47**

6) Avvístar klagur ... **57**

7) Onnur viðgerð og hjálp til borgarar ... **66**

8) Greinar ... **70**

9) Vitanarsavnið á heimasíðuni hjá umboðsmanninum ... **80**

10) Løgtingslóg nr. 60 frá 10. mai 2000 um Løgtingsins umboðsmann ... **82**

11) Yvirlit yvir endaliga viðgjørdar klagur og kanningar í 2023, har álit og skriv vórðu almannakunngjørd ... **86**



# Til Løgtingið

Vísandi til § 11, stk. 1 í løgtingslóg nr. 60 frá 10. mai 2000 um Løgtingsins umboðsmann lati eg av hondum hesa frágreiðing um virksemi mítt í 2023.

Ársfrágreiðingin skal sambært nevndu grein verða almannakunngjørd áðrenn 1. juli 2024.

Tórshavn, mai 2024

*Hanna Vang*
*Løgtingsins umboðsmaður*

# 1 Um embætið



*Hanna Vang, løgtingsins umboðsmaður, Fríða S. Berg, skrivstovufulltrúi, Heini Petersen, ráðgevi, Mary K. Cazabon, fulltrúi, og Gurið Joensen, ráðgevi*

Sambært § 1 í løgtingslóg nr. 60 frá 10. mai 2000 um Løgtingsins umboðsmann velur Løgtingið fyri eitt 5 - ára skeið ein uttantingsmann at hava innlit við fyrisiting heimastýrisins. Tann 9. oktober 2020 legði løgtingsformaðurin uppskot fyri Løgtingið at velja meg til løgtingsins umboðsmann fyri eitt 5 ára skeið frá 1. januar 2021. Eg tók við embætinum 1. apríl 2021. Umframt meg sjálva er embætið mannað við løgfrøðiligu ráðgevum mínum Gurið Joensen, Heina Petersen, Mary Kirstenardóttir Cazabon, fulltrúa og Fríðu S. Berg, skrivstovufulltrúa.

Við løgtingslóg kunnu verða gjørdar almennar reglur fyri virksemi umboðsmansins, sum annars í sínum starvi er óheftur av Løgtinginum (§ 3).

Virksemi umboðsmansins fevnir um alla fyrisiting heimastýrisins, t.e. bæði landsins og ta kommunalu (§ 4, stk. 1). Eisini feløg, stovnar, felagsskapir v.m., ið verða roknað við til almennu fyrisitingina sambært fyrisitingarlógini, eru fevndir av virksemi umboðsmansins (§ 4, stk. 2). Harumframt eru interkommunalir felagsskapir undirlagdir

virksemi umboðsmansins (§ 4, stk. 4). Harafturímóti fevnir virksemi hansara ikki um ríkismyndugleikar, Løgtingið og stovnar undir Løgtinginum (§ 4, stk. 5).

Umboðsmaðurin hevur eftirlit við, at tær umsitingareindir, sum eru fevndar av virksemi hansara, ikki gera mistøk ella vanrøkja skyldur sínar, og at almenna umsitingin ikki fremur órætt móti borgaranum (§ 5). Ein og hvør kann senda umboðsmanninum klagu um tær í § 4 nevndu umsitingareindir, sum eru fevndar av virksemi hansara (§ 6, stk. 1). Klagarin skal navngeva seg í klaguni, og skal klagan vera umboðsmanninum í hendi í seinasta lagi eitt ár eftir, at tey viðurskifti, ið klagað verður um, áttu sær stað (§ 6, stk. 2). Er talan um avgerðir, sum kunnu leggjast fyri hægri umsitingarmyndugleika, skal hesin møguleiki vera royndur fyrst, áðrenn klagað verður til umboðsmannin (§ 6, stk. 3). Eru hesar treytir loknar, tekur umboðsmaðurin støðu til, um grundarlag er fyri víðari kanningum í tí máli, ið klagað verður um (§ 6, stk. 4). Umboðsmaðurin kann eisini sjálvur av sínum eintingum taka eitt mál til viðgerðar og fremja neyðugar kanningar í hesum sambandi (§ 6, stk. 5). Tær í § 4 nevndu umsitingar hava skyldu at geva umboðsmanninum tær upplýsingar og at leggja fram øll tey skjøl, sum hesin embætisins vegna krevur at fáa fyrilagt. Umboðsmaðurin hevur rætt til at vitja øll tey støð, ið kannað verða, og hann hevur fría atgongd til at gera kanningar í øllum neyðugum hølum. Hann kann eisini stevna fólki í rættin at vitna um viðurskifti, ið eru avgerandi í kanningararbeiðinum (§ 8).

Tá umboðsmaðurin er liðugur við sínar kanningar, ger hann sína niðurstøðu, og metir hann, at álvarsligt mistak ella vansketni er framt, skal hann boða formansskapi Løgtingsins, løgmanni og viðkomandi landsstýrismanni og/ella kommunustýri frá hesum. Hann hevur rætt til alment at finnast at, koma við tilmælum og á annan hátt gera vart við meting sína av einum máli, hann hevur kannað. Hann kann eisini mæla viðkomandi myndugleikum til, at fríur rættargangur verður givin (§ 10). Rakar umboðsmaðurin við lýti í galdandi lógum, fyriskipanum ella umsitingarligum avgerðum, skal hann boða Løgtingi og viðkomandi landsstýrismanni frá hesum, og er talan um kommunal ella interkommunal viðurskifti, skal hann eisini boða viðkomandi kommunustýri frá (§ 12).

Lógin, oyðubløð og vegleiðing um, hvussu ein kann klaga til Løgtingsins umboðsmann, eru at finna á heimasíðu míni.

Adressan er:
**Løgtingsins umboðsmaður**
undir Bryggjubakka 11
Postsmoga 2008, FO-110 Tórshavn
teldupostadressa: **lum@lum.fo**
Heimasíða: **www.lum.fo**



# 2 Gongdin í 2023

## Innkomin og avgreidd mál í 2023

Í ársfrágreiðingini eru frásagnir av ymiskum málum, sum umboðsmaðurin hevur viðgjørt í 2023. Álit, skriv og frágreiðingar liggja í síni fullu longd í savninum á heimasíðuni.

Í 2023 fekk umboðsmaðurin 94 klagur. Av hesum vórðu 81 endaliga avgreiddar innan 31. desember. Harumframt vórðu avgreiddar 16 klagur frá undanfarnum árum. Talið av klagum er á leið tað sama sum í 2022.

Flestu innkomnu klagur í 2023 vóru á málsøkjunum "Umhvørvis-, byggi- og leigumál og friðing" og "Børn og ung".
Býtið av málum millum málsøkir sæst í talvu 2.

Eins og undanfarin ár fevnir málsøkið "Børn og ung" um øll mál viðvíkjandi børnum, eisini um málið ítøkiliga snúði seg um til dømis ein fyrisitingarligan spurning.

Av teimum 97 klagunum, sum vórðu avgreiddar í 2023, endaðu 17 við niðurstøðum í antin áliti ella skrivi. 61 klagur vórðu avgreiddar við aðrari viðgerð enn niðurstøðu frá umboðsmanninum, meðan 19 klagur vórðu avvístar uttan viðgerð.

Í 2023 vórðu givnar átalur í 13 málum.

## Mál av egnum ávum

Í ársfrágreiðingini eru eisini frásagnir frá málum, sum umboðsmaðurin tók upp og viðgjørdi av egnum ávum í 2023. Í 2023 tók umboðsmaðurin 4 mál upp av egnum ávum, harav 3 vórðu endaliga avgreidd í 2023.
Harumframt endaði umboðsmaðurin 2 mál av egnum ávum, sum vóru byrjað í 2022.
Frágreiðingar frá málunum av egnum ávum eru at finna í egnum kapitli.

## Eftirlitsvitjanir

Umboðsmaðurin kann gera eftirlitsvitjanir á almennum stovnum herundir á stovnum, har børn eru. Umboðsmaðurin metir eitt nú um umstøðurnar, veitta tilboðið og mannagongdirnar á staðnum.
Við árslok 2023 byrjaði umboðsmaðurin eina røð av vitjanum á stovnum, sum veita umlætting til børn og ung, sum ikki eru undir barnavernd. Byrjað varð við at vitja Dáan í Klaksvík í desember. Frágreiðingin frá vitjanini í Dáanum varð ikki liðug við árslok.

## Fyrispurningar

Umframt móttiknar klagur fær umboðsmaðurin hvørt ár munnligar og skrivligar fyrispurningar. Í 2023 fekk umboðsmaðurin 104 fyrispurningar um eitt nú møguleikan at klaga til umboðsmannin. Umboðsmaðurin vegleiðir borgarum í, hvussu klagast kann til umboðsmannin. Um málini ikki eru endaliga viðgjørd innan fyrisitingina, verður borgarin vístur til at nýta lógarásetta klagumøguleikan. Um tørvur er á løgfrøðiligari ráðgeving verður víst til Rættarhjálp Føroya.

## Greinar

Markið millum fyrisitingarligar avgerðir og útinnandi virksemi hjá almennum myndugleikum er týdningarmikið, millum annað tí at fyrisitingarlógin setur ymisk ítøkilig krøv til fyrisitingarligar avgerðir. Í hesi ársfrágreiðing er ein grein um avgerðarhugtakið í fyrisitingarlógini.

Eisini er ein grein um kunningarvirksemið hjá barnanna umboðsmanni í 2023.

## Luttøka í tiltøkum

Fyri at kunna seg um ymisk samfelagsviðurskifti og fáa betri fatan av umstøðum og avbjóðingum á ymiskum økjum hevur umboðsmaðurin luttikið í ymsum tiltøkum gjøgnum árið.

Tann 17. mars var umboðsmaðurin til ráðstevnu um tilfeingisrentu og tilfeingisgjøld í føroysku fiski- og alivinnuni í Løkshøll. Ráðstevnan varpaði ljós á verandi skipanir, eins og umboð úr Noregi og Íslandi greiddu frá skipanum í teirra londum.

Í juni var umboðsmaðurin saman við norðurlendsku barnaumboðunum á fundi í Oslo. Hóast norðurlondini hava skipað seg ymiskt, og tað tí eisini er sera stórur munur á heimildunum hjá barnaumboðunum, er hesin fundur sera gevandi í mun til, hvørjar avbjóðingar londini hvør sær hava. Evnið fyri fundin var børn í fongsli, men eisini vórðu avbjóðingar við barnafátækadømi og avleiðingar av covid-stongslinum umrøddar. Eisini varð vitjað á stovnum, sum hava við børn og ung at gera, har greitt varð frá, hvat stovnarnir gera fyri at liva upp til ásetingarnar í Barnarættindasáttmálanum.

Í døgunum 24. og 25. august luttók ein ráðgevi hjá umboðsmanninum á fundi fyri umsitingarstjórar hjá teimum norðurlendsku umboðsmonnunum. Umrødd vórðu evnir av áhuga fyri øll londini, eins og mannagongdir fyri klagumálsviðgerð. Slíkur fundur er gevandi fyri lítlan stovn sum Løgtingsins umboðsmann, við at innlit fæst í tær royndir, tey størru embætini hava gjørt sær.

Í døgunum 21. og 22. september luttóku tveir ráðgevar hjá umboðsmanninum á altjóða

umboðsmannafundi í Rom. Evnini fyri fundin vóru eitt nú, hvussu umboðsmenn kunnu vera brýr millum borgarar og myndugleikar, og hvat umboðsmenn kunnu gera í mun til, at bólkar av borgarum detta niður ímillum, nú krøvini til talgilda luttøku alsamt økjast.

Umboðsmaðurin luttók eisini í ymiskum kunnandi tiltøkum á barnaøkinum. Frágreiðing um hesi kann lesast í greinini ”Kunningarvirksemið á barnaøkinum”.

# 3 Hagtøl

| | |
|---|---|
| Talva 1–3 | Innkomnar klagur í 2023 |
| Talva 4–7 | Klagur, sum blivu lidnar í 2023 |
| Talva 8 | Mál av egnum ávum |
| Talva 9–13 | Málsviðgerðartíðin av málum, sum blivu liðug í 2023 |
| Mynd 1–6 | Sammetingar við undanfarin ár |

# Innkomnar klagur í 2023 býttar á myndugleikar

Í 2023 komu inn 94 klagur.
Hesar klagur vóru býttar soleiðis millum ymisku myndugleikarnar:

Talva 1

| Myndugleiki | Klagur |
|---|---|
| Almannaverkið | 7 |
| Barna- og útbúgvingarmálaráðið | 2 |
| Barnaverndartænastur | 10 |
| Búnaðarstovan | 3 |
| Fíggjarmálaráðið | 2 |
| Fiskimálaráðið | 1 |
| Føroya Kærustovnur | 8 |
| Glasir | 1 |
| Hegnsýnisnevndin í Runavíkar kommunu | 1 |
| Heilsumálaráðið | 2 |
| Heilsutrygd | 2 |
| Kommunur | 31 |
| Leigunevndin | 1 |
| Løgmálaráðið | 1 |
| Løgmansskrivstovan | 1 |
| Sernám | 1 |
| SEV | 4 |
| Skúlin á Argjahamri | 1 |
| Strandfaraskip Landsins | 2 |
| Studni | 1 |
| Taks | 1 |
| Tórshavnar havn | 1 |
| Umhvørvismálaráðið | 2 |
| Umhvørvisstovan | 2 |
| Uttanríkis- og vinnumálaráðið | 2 |
| Vinnuháskúlin | 1 |
| Visit Faroe Islands | 1 |
| Annað | 2 |
| **Tilsamans** | **94** |

# Innkomnar klagur í 2023 býttar á málsøki

Talva 2

| Málsøki | Tal av klagum |
|---|---|
| Almanna-, familju og heilsumál | 9 |
| Børn og ung | 20 |
| Flutningur, tele- og dátasamskifti og vegir | 3 |
| Kommunumál | 11 |
| Lendis- og búnaðarmál, matrikul | 11 |
| Skattur og avgjøld v.m. | 5 |
| Starvsfólkamál og arbeiðsmarknaðarmál | 5 |
| Umhvørvis, byggi-/leigumál og friðing | 22 |
| Undirvísing, gransking, kirkja og mentan | 4 |
| Uttanríkis- og verjumál | 1 |
| Vinnulívs- og fiskivinnumál v.m. | 2 |
| Annað | 1 |
| **Tilsamans** | **94** |

# Innkomnar klagur í 2023 býttar á evni

Talva 3

| Evni | Tal |
|---|---:|
| Avgerð | 28 |
| Vantandi avgerð | 3 |
| Atburður | 2 |
| Gegni | 1 |
| Innlit | 15 |
| Málsviðgerðartíð | 11 |
| Notatskylda og journalisering | 2 |
| Partshoyring | 1 |
| Útinnandi fyrisiting | 5 |
| Vantandi kunning | 1 |
| Vantandi svar | 15 |
| Vegleiðing | 1 |
| Aðrir málsviðgerðarspurningar | 9 |
| **Tilsamans** | **94** |

# Endaliga avgreiddar klagur í 2023

Av teimum 94 klagunum, sum komu inn í 2023, vóru 81 endaliga avgreiddar innan 31. desember 2023. Harumframt vóru avgreiddar 16 klagur frá undanfarnum árum. Úrslitið av viðgerðini var hetta (býtt upp eftir myndugleika):

Talva 4

| Klagur býttar á myndugleika | | Endaðar við | | |
|---|---|---|---|---|
| Myndugleiki | Klagur | Avvístar | Onnur viðgerð | Viðgjørdar við áliti ella skrivi |
| Almannaverkið | 7 | 2 | 5 | |
| Arbeiðs- og brunaeftirlitið | 1 | | | 1 |
| Barna- og útbúgvingarmálaráðið | 2 | | 2 | |
| Barnaverndartænastur | 10 | 2 | 8 | |
| Búnaðarstovan | 3 | 1 | 2 | |
| Dátueftirlitið | 1 | | 1 | |
| Fíggjarmálaráðið | 2 | | 2 | |
| Fiskimálaráðið | 1 | | 1 | |
| Føroya Kærustovnur | 6 | 1 | 5 | |
| Glasir | 1 | 1 | | |
| Hegnsýnisnevndin í Runavíkar kommunu | 1 | 1 | | |
| Heilsumálaráðið | 3 | | 2 | 1 |
| Heilsutrygd | 1 | 1 | | |
| Kommunur | 31 | 4 | 20 | 7 |
| Løgmálaráðið | 1 | | 1 | |
| Løgmansskrivstovan | 1 | | 1 | |
| Sernám | 1 | 1 | | |
| SEV | 2 | | 2 | |
| Skráseting Føroya | 2 | | 2 | |
| Skúlin á Argjahamri | 1 | 1 | | |
| Skúlin á Trøðni | 1 | | | 1 |
| Strandfaraskip Landsins | 3 | 1 | 1 | 1 |
| Studni | 1 | 1 | | |
| Taks | 1 | | 1 | |
| Tórshavnar havn | 1 | | | 1 |
| Umhvørvis- og vinnumálaráðið | 1 | | | 1 |
| Umhvørvismálaráðið | 1 | | 1 | |
| Umhvørvisstovan | 2 | 1 | | 1 |
| Uttanríkis- og mentamálráðið | 1 | | | 1 |
| Uttanríkis- og vinnumálaráðið | 2 | | 1 | 1 |
| Vinnuháskúlin | 1 | | 1 | |
| Visit Faroe Islands | 1 | 1 | | |
| Yrkisdepilin | 1 | | | 1 |
| Annað | 2 | | 2 | |
| **Tilsamans** | **97** | **19** | **61** | **17** |

## Viðgjørdar klagur í 2023 har umboðsmaðurin veitti aðra viðgerð og hjálp til borgarar

Í 2023 vóru viðgjørdar 61 klagur, har umboðsmaðurin veitti aðra viðgerð og hjálp til borgarar. Býtið teirra millum sæst niðanfyri:

Talva 5

| Onnur viðgerð og hjálp | Klagur |
|---|---|
| Gongd komin á málið | 8 |
| Umboðsmaðurin metti ikki grundarlag vera fyri at gera meira við málið | 35 |
| Klagari vístur til kærumyndugleika | 2 |
| Málið tikið uppaftur | 2 |
| Annað | 14 |
| **Tilsamans** | **61** |

## Avvístar klagur í 2023

Í 2023 vóru 19 klagur avvístar av ymiskum orsøkum.
Býtið teirra millum sæst niðanfyri:

Talva 6

| Avvísingarorsøk | Klagur |
|---|---|
| Innkomin ov seint | 3 |
| Kærumyndugleiki ikki troyttur | 12 |
| Uttanfyri heimildarøkið | 3 |
| Vantandi fulltrú | 1 |
| **Tilsamans** | **19** |

## Viðgjørdar klagur í 2023 býttar á málsøki

Tey málini, sum vóru endaliga viðgjørd í 2023, kunnu býtast upp eftir málsøki á hendan hátt:

Talva 7

| Málsøki | Klagur |
|---|---:|
| Almanna-, familju og heilsumál | 9 |
| Børn og ung | 20 |
| Flutningur, tele- og dátasamskifti og vegir | 6 |
| Kommunumál | 10 |
| Lendis- og búnaðarmál, matrikul | 13 |
| Skattur og avgjøld v.m. | 6 |
| Starvsfólkamál og arbeiðsmarknaðarmál | 8 |
| Umhvørvis, byggi-/leigumál og friðing | 16 |
| Undirvísing, gransking, kirkja og mentan | 5 |
| Uttanríkis- og verjumál | 1 |
| Vinnulívs- og fiskivinnumál v.m. | 2 |
| Annað | 1 |
| **Tilsamans** | **97** |

## Mál tikin upp av egnum ávum - eftirlitsvitjanir og kanningar

Av teimum 4 málunum, sum umboðsmaðurin sjálvur tók upp í 2023, vóru 3 endaliga avgreidd innan 31. desember 2023. Harumframt vóru avgreidd 2 mál frá undanfarnum árum. Frágreiðingarnar kunnu lesast frá síðu 47.

Talva 8

| Avgreiddu málini eru býtt soleiðis millum ymisku myndugleikarnar | | |
|---|---|---|
| **Byrjað** | **Heiti á máli** | **Myndugleiki** |
| 2022 | Kanning av eftirlitsvitjanum hjá barnaverndartænastunum, sambært § 16, stk. 3 í Barnaverndarlógini | Barnaverndartænasturnar |
| 2022 | Fyrisitingarlig mannagongd, tá Etiska ráðið verður sett | Heilsumálaráðið |
| 2023 | Kanning av eftirlitisskylduni hjá Almannamálaráðnum á eldraøkinum | Almanna- og mentamálaráðið |
| 2023 | Nágreining av § 3, stk. 2 í Dagstovnalógini, nær dagstovnar og dagrøktir skulu hava opið | Barna- og útbúgvingarmálaráðið |
| 2023 | Kanning av innlitsmálum hjá størru kommununum | Fleiri kommunur |

Málsviðgerðartíðin av klagum, sum endaðu við áliti ella skrivi.
Miðalviðgerðartíðin av teimum 17 endaligu viðgjørdu klagunum, har álit vóru skrivað, var:
*(Roknað er við 30 døgum pr. mánað)*

Talva 9

| Viðgerðartíð í miðal | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Aftaná partshoyring | 1 | mðr. | 10 | dagar |
| Samlað | 5 | mðr. | 12 | dagar |

Málsviðgerðartíðin av klagum, har umboðsmaðurin hevur veitt aðra viðgerð og hjálp til borgarar.
Miðalviðgerðartíðin av teimum 61 klagunum, har umboðsmaðurin veitti borgarum aðra hjálp og viðgerð, var:
*(Roknað er við 30 døgum pr. mánað)*

Talva 10

| Viðgerðartíð í miðal | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Aftaná partshoyring | 0 | mðr. | 5 | dagar |
| Samlað | 1 | mðr. | 9 | dagar |

## Málsviðgerðartíðin av avvístum klagum

Miðalviðgerðartíðin av teimum 19 avvístu klagunum var:
*(Roknað er við 30 døgum pr. mánað)*

Talva 11

| Viðgerðartíð í miðal | | |
|---|---|---|
| Aftaná partshoyring | 2 | dagar |
| Samlað | 19 | dagar |

## Málsviðgerðartíðin av bæði viðgjørdum og avvístum klagum

Miðalviðgerðartíðin fyri allar klagur, bæði avvístar og endaligar viðgjørdar klagur, var:
*(Roknað er við 30 døgum pr. mánað)*

Talva 12

| Viðgerðartíð í miðal | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Aftaná partshoyring | 0 | mðr | 10 | dagar |
| Samlað | 1 | mðr | 27 | dagar |

## Málsviðgerðartíðin av málum av egnum ávum:

Miðalviðgerðartíðin av teimum 5 málunum, sum vóru avgreidd í 2023, var:
*(Roknað er við 30 døgum pr. mánað)*

Talva 13

| Viðgerðartíð í miðal | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Aftaná partshoyring | 1 | mðr | 26 | dagar |
| Samlað | 5 | mðr | 26 | dagar |

# Sammetingar 2021–2023

Mynd 1




## Avvísingarorsøk

Mynd 2



## Innkomnar klagur býttar á málsøki

Mynd 3




## Innkomnar klagur býttar á evni

Mynd 4



## Innkomnar klagur býttar á áðalráðini við undirliggjandi stovnum, kommunur, Føroya Kærustovn og mál um børn og ung

**Tá nýtt landsstýrið verður skipað, hendir, at aðalráð skifta heiti og málsøkir, tí ber ikki altíð til at gera samanberingar yvir fleiri tíðarskeið. Í hesum sambandi eru tølini fyri 2023 sett í talvu fyri seg.*

Mynd 5






# Innkomnar klagur 2001 – 2023

Mynd 6





# 4 Álit

## Álit og skriv

Umboðsmaðurin viðger klagur um avgerðir hjá myndugleikunum, eins og viðferð teirra av borgarum og málum. Ein borgari kann t.d. klaga um, at ein umsókn er noktað, um tann valda viðgerðarháttin, um ta tíðina, sum hetta hevur tikið ella framferðarháttin hjá myndugleikanum.

Um umboðsmaðurin, eftir at hava kannað málið, kemur til ta niðurstøðu, at hann gevur klagaranum viðhald, kann hann finnast at myndugleikanum. Umboðsmaðurin kann eisini heita á myndugleikan um at umhugsa málið av nýggjum og taka eina aðra avgerð. Umboðsmaðurin kann ikki sjálvur broyta eina avgerð. Uppgávan hjá umboðsmanninum er sostatt at greiða myndugleikanum frá, at hesin eftir hansara fatan hevur gjørt eitt mistak.

Í summum førum er umboðsmaðurin samdur við myndugleikanum, men av tí at umboðsmaðurin metir, at evnið hevur almennan áhuga, almannakunnger umboðsmaðurin eitt skriv um niðurstøðu sína.

Niðanfyri eru dømir um mál, sum umboðsmaðurin hevur avgreitt við einum áliti ella skrivi.

**MÁL NR. 22/10345 og 23/00151**

## Umhvørvismálaráðið og Tórshavnar kommuna høvdu ikki viðgjørt eina broyting í byggisamtyktini fyri Velbastað á nøktandi hátt

Umboðsmaðurin fekk eina klagu um, at Tórshavnar kommuna og Umhvørvismálaráðið ikki viðgjørdu broytingar í byggisamtyktini fyri Velbastað á nøktandi hátt. Umboðsmaðurin gav Tórshavnar kommunu eina álvarsliga átalu fyri handfaringina av málinum og gav eisini Umhvørvismálaráðnum eina átalu fyri viðgerðina og mælti ráðnum til at taka málið uppaftur.

Klagan snúði seg um tvær broytingar í byggisamtyktini fyri Velbastað. Tann eina broytingin var viðvíkjandi parti av einum matrikli, sum varð broytt frá K-landbúnaðarøki til B-sethúsaøki, og hevði samband við eina ætlan at útstykkja 11 grundstykkir til sethús. Hin broytingin var viðvíkjandi parti av einum matrikli, sum varð broytt frá H-frílendi til B-sethúsaøki, og sum hevði samband við, at nýggjur festari vildi byggja sethús har, sum virksemið hjá festinum var.

Umboðsmaðurin hevði ikki viðmerkingar til viðgerðina av fyrru broytingini.

Seinna broytingin byrjaði sum eitt mál, sum fekk neiliga viðgerð í umsitingini. Umsitingin metti, at býarskipanarligt grundarlag var ikki fyri at broyta byggisamtyktina fyri hendan matrikul, og at einstakur borgari, við tilvísing til støðuna sum festari, fekk framíhjárættindi til at velja sær út ávíst grundøki, hóast staðsetingin ikki var ein fyritreyt fyri raksturin av festinum. Umsitingin avgjørdi tí fyribils ikki at leggja málið fyri politiska myndugleikan.

Málið varð tó stutt eftir sett fram á býráðsfundi av formanninum í Byggi- og býarskipanarnevndini sum broytingaruppskot til málið um fyrru broytingina, sum dagin fyri varð viðgjørt í Byggi- og býarskipanarnevndini. Á hendan hátt komu báðar broytingarnar í sama mál og blivu hereftir viðgjørdar saman uttan nakra skrivliga fyrireiking ella málslýsing av seinnu broytingini.

Ongar skrivligar upplýsingar vóru um, hví formaðurin í Byggi- og býarskipanarnevndini vildi fremja málið, sum tað sambært umsitingini ikki var býarskipanarligt grundarlag fyri.

**Málsviðgerðin hjá Tórshavnar kommunu**

Samanumtikið helt umboðsmaðurin, at handfaringin hjá Tórshavnar kommunu av málinum um seinnu broytingina var sera ivasom. Kommunan hevði ikki upplýst málið nøktandi, ikki gjørt notat frá týðandi stigum í málinum og ikki svarað mótmælinum viðv. broytingini.

Viðgerðin var heldur ikki samsvarandi reglunum í Kommunustýrislógini og Kommunustýrisskipanini hjá Tórshavnar kommunu um, hvussu mál verða løgd fyri býráðið til avgerðar.

Sum málið varð lýst, kundi umboðsmaðurin ikki útihýsa, at ósaklig atlit vóru orsøk til broytingaruppskotið.

Umboðsmaðurin gav tí Tórshavnar kommunu eina álvarsliga átalu fyri handfaringina av málinum.

Av tí at umboðsmaðurin helt talan vera um, at álvarslig mistøk vórðu framd í hesum máli, kunnaði hann, sambært § 10, stk. 1 í umboðsmanslógini, formansskapin í Løgtinginum, løgmann, landsstýrismannin í kommunumálum og landsstýrismannin í umhvørvismálum um málið.

**Málsviðgerðin hjá Umhvørvismálaráðnum**

Landsstýrismaðurin í umhvørvismálum er, sambært lógini um býarskipanir og byggisamtyktir, góðkenningarmyndugleiki í sambandi við gerð og broyting av byggisamtyktum hjá kommununum. Sum góðkenningarmyndugleiki fremur ráðið saman

við Býarskipanarnevnd landsins eitt rættargildiseftirlit, sum skal tryggja, at kommunan hevur framt broytingina á rættan hátt.

Umboðsmaðurin helt, at Umhvørvismálaráðið hevði góðkent seinnu broytingina uttan at tryggja sær, at málið var nøktandi upplýst, og uttan at tryggja sær, at mótmæli klagarans viðvíkjandi hesi broyting var svarað. Umboðsmaðurin gav tí Umhvørvismálaráðnum eina átalu fyri viðgerðina av málinum og mælti Umhvørvismálaráðnum til at taka málið uppaftur.

*Uppfylging*
Tann 3. mars 2023 boðaði Umhvørvismálaráðið umboðsmanninum frá, at ráðið tók áheitanina frá umboðsmanninum, um at taka málið uppaftur, til eftirtektar.
Ráðið hevði í hesum sambandi boðað Tórshavnar kommunu frá, at góðkenningin av broytingini í byggisamtyktini fyri part av matr. nr. 6a, sum varð givin 8. mars 2022, fyribils varð tikin aftur.
Av fylgiskrivi, ið ráðið hevði sent Tórshavnar kommunu sama dag, sást, at ráðið hevði tikið góðkenningina aftur og givið kommununi hesi boð: "Treytin fyri, at Umhvørvismálaráðið av nýggjum kann taka støðu til góðkenning av ætlaðu broytingini av byggisamtyktini fyri matr. nr. 6a á Velbastað, er, at Tórshavnar kommuna tekur málið upp til nýggja viðgerð, frá tí viðgerðarstigi, at freistin at mótmæla broytingini í byggisamtyktini var úti."

MÁL NR. 22/13344

## Arbeiðs- og brunaeftirlitið svaraði ikki fyrispurningum frá borgara

Ein borgari vendi sær til umboðsmannin við einari klagu um, at Arbeiðs- og brunaeftirlitið hvørki hevði svarað fyrispurningum hansara ella kunnað hann í sambandi við, at stovnurin kannaði eina arbeiðsvanlukku, ið honum hevði verið fyri. Klagarin hevði tá bíðað eftir svari frá Arbeiðs- og brunaeftirlitinum í nærum eitt ár.

Í frágreiðing til umboðsmannin ásannaði Arbeiðs- og brunaeftirlitið, at málsviðgerðartíðin hevði verið óvanliga long. Arbeiðs- og brunaeftirlitið greiddi frá, at hetta stóðst av upprúgvaðum arbeiðsuppgávum, ið vóru íkomnar, tí stovnurin hevði havt uppgávur í sambandi við handfaringina av COVID19 farsóttini, umframt sjúkraskrivingar og sóttarhald hjá starvsfólki. Harafturat staðfesti stovnurin, at áheitanirnar frá klagaranum vórðu skrásettar uttan ábyrgdarpersón og tískil ikki vóru viðgjørdar. Arbeiðs- og brunaeftirlitið metti ikki málsviðgerð sína hava verið nøktandi ella í samsvari við góðan fyrisitingarsið og upplýsti, at stovnurin nú hevði sett tiltøk í verk, soleiðis at slíkt ikki skuldi henda aftur. Stovnurin kunnaði eisini klagaran og umboðsmannin um, at klagarin væntandi fór at fáa eitt endaligt svar um mánaðarskiftið september/oktober 2022.

Umboðsmaðurin tók frágreiðingina og kunningina frá Arbeiðs- og brunaeftirlitinum til eftirtektar og kunnaði klagaran um, at grundarlag ikki var fyri at gera meira við málið.

Tann 11. oktober 2022 vendi klagarin sær aftur til umboðsmannin og boðaði frá, at hann framvegis ikki hevði frætt frá Arbeiðs- og brunaeftirlitinum, og at hann til fánýtis hevði roynt at fingið fatur á stovninum.

Grundað á hetta, bað umboðsmaðurin, tann 28. oktober 2022, Arbeiðs- og brunaeftirlitið um at geva sær eina frágreiðing um málsviðgerðina av málinum umframt øll skjøl.

Eftir at hava mint Arbeiðs- og brunaeftirlitið á málið fekk umboðsmaðurin, tann 6. desember 2022, umbidnu frágreiðing og skjøl. Í skjølunum sást, at Arbeiðs- og brunaeftirlitið hevði gjørt endaliga niðurstøðu í málinum tann 31. oktober 2022.

Umboðsmaðurin helt, at tá stovnurin í roynd og veru hevði tikið seinasta málsviðgerðarstigið í málinum, tann 31. oktober 2022, átti stovnurin uttan óneyðugt drál at havt greitt umboðsmanninum frá hesum. Umboðsmaðurin helt tað vera átaluvert, at Arbeiðs- og brunaeftirlitið uttan haldgóða grund ikki hevði latið við seg koma fyrrenn 6. desember 2022.

Harafturat helt umboðsmaðurin tað vera átaluvert og í stríð við góðan fyrisitingarsið, at klagarin onga kunning hevði fingið frá Arbeiðs- og brunaeftirlitinum, tá niðurstøðan hjá stovninum ikki varð liðug um mánaðarskiftið september/oktober 2022, sum ætlað. Vísandi til at málsviðgerðin av málinum samanløgd hevði verið drúgv, átti tað í øllum førum tá at hava staðið Arbeiðs- og brunaeftirlitinum greitt, at stovnurin átti at havt kunnað klagaran um seinkingina.

Umboðsmaðurin helt tað eisini vera átaluvert, at tað var neyðugt hjá sær at geva Arbeiðs- og brunaeftirlitinum samanlagt tríggjar áminningar, umframt at hann í einum føri mátti heita á landsstýrismannin í vinnumálum um at taka neyðug stig til at Arbeiðs- og brunaeftirlitið gav umboðsmanninum eitt svar.

Samanumtikið gav umboðsmaðurin Arbeiðs- og brunaeftirlitinum eina átalu fyri málsviðgerðina av málinum.

**MÁL NR. 22/15694**

## Yrkisdepilin átalu fyri handfaring av førleikameting

Ein borgari klagaði til umboðsmannin um handfaringina hjá Yrkisdeplinum av einari førleikameting, ið Yrkisdepilin varðaði av og hevði skipað fyri. Klagarin, ið var útbúgvin

bakari, vildi førleikametast, tí hann ynskti at útvega sær sjóvinnubræv sum skipskokkur við handilsskipi.

Kravið í lóggávuni til sjóvinnubræv sum skipskokkur við handilsskipi var, at viðkomandi hevði sveinabræv innan kokkayrki, ið merkti, at hann skuldi vera útbúgvin gastronomur.

Sambært avtalu millum Yrkisdepilin og Tekniska Skúla í Klaksvík, skuldi skúlin standa fyri at førleikameta klagaran og orða eina niðurstøðu í hesum sambandi.

Yrkisdepilin hevði frammanundan greitt víst skúlanum á, at førleikametingin av klagaranum skuldi fremjast, og niðurstøða orðast sambært útbúgvingini til gastronomatstøðara, ið ikki gav rætt til sjóvinnubræv sum skipskokkur við handilsskipi, men við fiskiskipi.

Hóast hetta hevði skúlin orðað eina niðurstøðu, ið vísti, at klagarin var førleikamettur innan kokkayrkið sum skipskokkur við handilsskipi. Skúlin hevði síðani sent Yrkisdeplinum niðurstøðuna, ið gjørdi ávísar tillagingar í niðurstøðuni uttan at seta spurnartekin við høvuðsinnihaldið í henni.

Tá Sjóvinnustýrið eftirfylgjandi sáddi iva um upprunaligu niðurstøðuna, broytti Yrkisdepilin hana soleiðis, at hon nú vísti, at klagarin var førleikamettur sambært útbúgvingini til gastronomatstøðara.

Umboðsmaðurin helt, at Yrkisdepilin ikki hevði hildið skyldu sína at vegleiða klagaran. Umboðsmaðurin vísti m.a. á, at Yrkisdepilin átti at vita, at ynski klagarans, um at útvega sær sjóvinnubræv sum skipskokkur við handilsskipi, var ein avgerandi fortreyt fyri hann. Umboðsmaðurin helt eisini, at Yrkisdepilin frammanundan førleikametingini greitt visti, hvørjar møguleikar ein slík kundi geva klagaranum, og hvørjar avmarkingar vóru. Umboðsmaðurin helt eisini, at tað var átaluvert, at Yrkisdepilin ikki hevði sett spurnartekin við høvuðsinnihaldið í upprunaligu niðurstøðuni, ið skúlin hevði sent Yrkisdeplinum.

Samanumtikið gav umboðsmaðurin Yrkisdeplinum og Undirvísingarstýrinum, ið varðaði av málsøkinum “Førleikmenning”, eina átalu fyri handfaringina og málsviðgerðina av málinum.

MÁL NR. 22/16566

## Strandfaraskip Landsins gav skeiva grundgeving fyri at sýta fyri innliti

Ein borgari klagaði til umboðsmannin um, at hann ikki hevði fingið alment innlit í ávís roknskapartøl og teldupostar, ið Strandfaraskip Landsins hevði sent Landsverk.

Umboðsmaðurin helt, at soleiðis sum umbønin um alment innlit í roknskapartølini var orðað, var talan ikki um eina umbøn um alment innlit sambært innlitslógini, men heldur um ein vanligan fyrispurning til stovnin um, at fremja eina viðgerð av almennum roknskapartølum. Umboðsmaðurin gav tó í hesum høpi gætur, at Strandfaraskip Landsins, hóast hetta, hevði givið klagaranum umrøddu roknskapartøl samsvarandi fyrispurningi hansara.

Hinvegin hevði Strandfaraskip Landsins sýtt fyri at lata klagaranum alment innlit í umrøddu teldupostar, ið Strandfaraskip Landsins hevði sent Landsverk. Strandfaraskip Landsins vísti á, at talan var um arbeiðsskjøl, ið vóru fevnd av § 10, nr. 5 í innlitslógini, ið skerjir rættin til alment innlit í tilfar, ið verður útvegað sum grundarlag til gerð av almennum hagtølum og vísindaligum kanningum.

Umboðsmaðurin tók ikki undir við hesari grundgeving. Umboðsmaðurin vísti á, at § 10, nr. 5 einans kann verða nýtt av einum myndugleika, ið útvegar sær tilfar. Strandfaraskip Landsins hevði í hesum høpi latið tilfar og kundi tískil ikki nýta § 10, nr. 5 sum grundgeving fyri at sýta fyri almennum innliti.

Klagarin hevði, tá hann fekk svar, bíðað í nærum 5 mánaðir eftir at fáa svar. Strandfaraskip Landsins hevði sum grundgeving fyri longu málsviðgerðartíðini víst á, at stovnurin hevði havt starvsfólkatrot, og at støðan hjá stovninum hevði verið trupul.

Umboðsmaðurin helt tó, at soleiðis sum málið var lýst, var ongin saklig orsøk til, at stovninum tørvaði nærum 5 mánaðir at gera sær eina meting av, um alment innlit kundi latast í umrøddu teldupostar.

Umboðsmaðurin gav Strandfaraskip Landsins eina átalu fyri drúgvu málsviðgerðina av umbøn klagarans um alment innlit.

Umboðsmaðurin heitti eisini á Strandfaraskip Landsins um at taka uppaftur viðgerðina av umbøn klagarans um alment innlit og lata seg frætta, hvat víðari hendi í málinum.

*Uppfylging*
Strandfaraskip Landsins kunnaði eftir hetta umboðsmannin um, at klagarin fór at fáa alment innlit í umrøddu teldupostar.

MÁL NR. 22/21174

## Uttanríkis- og mentamálaráðið ikki lýst setanarmál til fulnar, áðrenn avgerð varð tikin

Ein borgari klagaði til umboðsmannin um grundgevingina, ið klagarin, tann 1. november 2022, hevði fingið í sambandi við, at hann hevði søkt starv sum skúlastjóri í Vestmanna skúla, men ikki fingið starvið bjóðað, hóast hann varð tilnevndur sum nr. 1 av einari samdari setanarnevnd. Landsstýrismaðurin valdi at seta umsøkjaran, ið varð tilnevndur sum nr. 2 í starvið.

Klagan var grundað á niðurstøðu umboðsmansins í álitinum "Álit viðvíkjandi klagu um málsviðgerðina hjá Uttanríkis- og mentamálaráðnum í sambandi við setan av skúlastjóra í Vestmanna skúla", dagfest 1. juli 2022. Í álitinum gav umboðsmaðurin Uttanríkis- og mentamálaráðnum eina átalu fyri ikki at geva klagaranum eina nøktandi grundgeving.

Soleiðis, sum málið varð lýst, hevði umboðsmaðurin ikki orsøk at halda, at seinna grundgevingin ikki gav eina rætta lýsing av teimum atlitum, ið landsstýrismaðurin hevði valt at leggja dent á.

Í grundgevingini varð m.a. víst á, at landsstýrismaðurin hevði lagt størri dent á viðmælini, ið umsøkjarin, ið varð tilnevndur sum nr. 2, hevði lagt við síni umsókn, enn setanarnevndin.

Vísandi til skylduna at lýsa eitt mál til fulnar, undraðist umboðsmaðurin á, at landsstýrismaðurin ikki hevði tikið stig til at kanna, um viðurskiftini í viðmælunum hjá umsøkjaranum, ið varð tilnevndur sum nr. 2, kundu samanberast við viðurskifti hjá umsøkjaranum, ið varð tilnevndur sum nr. 1. Eitt nú helt umboðsmaðurin, at landsstýrismaðurin kundi heitt á umsøkjaran, ið varð tilnevndur sum nr. 1, um at lýst ávís viðurskifti nærri ella sett seg í samband við tann ella teir tilvísingarpersónar, ið hann hevði upplýst í sambandi við setanartilgongdina.

Umboðsmaðurin vísti á, at sum meginregla er tað ikki ósakligt at leggja dent á viðmæli, ið umsøkjari hevur lagt við sínari umsókn. Klagarin varð tilnevndur sum nr. 1 av eini samdari setanarnevnd, eins og klagarin eftir meting umboðsmansins hevði munin við atliti at skeiðum og útbúgving í leiðslu. Umboðsmaðu helt tað vera atfinningarsamt í ítøkiliga málinum, at landsstýrismaðurin hevði lagt avgerandi dent á ávís viðurskifti í viðmælunum hjá tí, ið varð tilnevndur sum nr. 2, uttan at gera eina roynd at fáa eina sambæriliga lýsing av umsøkjaranum, ið varð tilnevndur sum nr. 1.

Grundað á at báðir umsøkjararnir av setanarnevndini vórðu mettir skikkaðir at røkja starvið sum skúlastjóri í Vestmanna skúla, rúmu tíðina, ið var fráliðin, og at starvið sum skúlastjóri í Vestmanna skúla síðani hevði verið lýst leyst av nýggjum, gjørdi umboðsmaðurin samanumtikið ikki meira við málið.

MÁL NR. 22/22596

## Skúlin á Trøðni fekk eina átalu fyri handfaringina av skúlagongdini hjá einum barni

Foreldur klagaðu til umboðsmannin um undirvísingina av barni teirra í Skúlanum á Trøðni.

Klagan snúði seg í høvuðsheitum um góðskuna av undirvísingini, hvørji fak undirvíst varð í og vantandi lærarar, tal av undirvísingartímum, tímatalvur og lærubøkur. Klagararnir gjørdu m.a. galdandi, at undirvísingin ikki tók støði í fortreytunum hjá barni teirra, at nærum ongar lærubøkur vórðu brúktar í undirvísingini, og at barn teirra ikki hevði fingið teir undirvísingartímar og undirvísing í teimum fakum, sum ásett er í fólkaskúlalógini.

Umboðsmaðurin vísti millum annað á, at hugtakið "undirvísing" sambært serskúlalógini skal fatast í víðastu merking, og at serskúlalógin gevur Skúlanum á Trøðni rættiliga víðar heimildir at meta um vavið á bókligu undirvísingini av einstaka næminginum, og hvørjum fakum einstaki næmingurin skal undirvísast í. Umboðsmaðurin helt tað tó vera atfinningarsamt, at Skúlin á Trøðni hevði frítikið barnið frá ávísum fakum, uttan at hetta varð gjørt í samráð við foreldrini.

Umboðsmaðurin minti Skúlan á Trøðni á, at næmingar í Skúlanum á Trøðni hava rætt til sama tímatal, sum næmingar í fólkaskúlanum, á sama floksstigi, uttan so at ein ítøkilig meting verður gjørd um annað.

Umboðsmaðurin helt tað vera atfinningarsamt, at læriætlanirnar hjá barninum hjá klagarunum eingi ítøkilig mál høvdu um, hvat barnið skuldi læra fakligt, at tær ikki vórðu lagdar fyri klagararnar og ikki vórðu eftirmettar minst 2 ferðir um árið við kunning til klagararnar, sum ásett í serskúlalógini.

Umboðsmaðurin helt tað eisini vera atfinningarsamt, at eingin tímatalva var fyri skúlagongdina hjá barninum í 2020/2021, og at klagararnir, hóast teir fleiri ferðir bóðu um tað, ikki fingu útflýggjað tímatalvurnar hjá barninum.

Umboðsmaðurin vísti harumframt á, at ógreitt er, hvussu ásetingin í serskúlalógini § 6, stk. 2 um, at undirvíst verður eftir fólkaskúlalógini, ítøkiliga skal skiljast. Umboðsmaðurin helt hetta vera eitt lýti við lógini og mælti tí Barna- og útbúgvingarmálaráðnum til, at rættindi og skyldur hjá næmingum, sum ganga í serskúla, verða ítøkiliga ásett í lóggávuni.

Samanumtikið gav umboðsmaðurin Skúlanum á Trøðni eina átalu fyri handfaringina av skúlagongdini hjá ítøkiliga barninum.

Av tí at umboðsmaðurin helt lýti vera við serskúlalógini, boðaði hann eisini Løgtinginum og landsstýrismanninum í Barna- og útbúgvingarmálum frá hesum.



MÁL NR. 23/05602

# Umboðsmaðurin mælti Tórshavnar kommunu/Havnanevndini til at endurskoða gjaldsskránna og vøruskránna við atliti at vørugjaldinum fyri ammoniumnitrat

Ein advokatur klagaði vegna eitt felag um, at Tórshavnar havn ikki viðgjørdi allar borgarar eins, tá tað snúði seg um vørugjald av ammoniumnitrati, sum varð innflutt um Tórshavnar havn. Hann vísti á, at ammoniumnitrat, sum klientur hansara innflutti til framleiðslu av spreingievni, varð viðgjørt sum vørubólkur 4604 "Spreingievni, dynamitt", hóast talan ikki var um spreingievni. Ammoniumnitrat, sum bøndur og onnur innflyta, varð viðgjørt sum vørubólkur 4901 "Taðevni, salpetur o.t.".

Advokaturin vísti á, at Tórshavnar havn kravdi hansara klient at rinda 25 kr. pr. kg. av innfluttum ammoniumnitrati, meðan bøndur og onnur, sum innfluttu ammoniumnitrat, rindaðu 3 kr. pr. kg. Sambært advokatinum tyktist tað, sum Tórshavnar havn tók atlit at, hvat innflytarin nýtti ammoniumnitrati til. Hetta helt advokaturin ikki vera eitt sakligt atlit í sambandi við vørugjald fyri innflutning av ammoniumnitrati.

Advokaturin hevði kært avgerðina hjá Tórshavnar havn til Havnanevndina hjá Tórshavnar kommunu, og Havnanevndin hevði staðfest avgerðina hjá Tórshavnar havn.

Umboðsmaðurin spurdi seg fyri hjá Arbeiðs- og brunaeftirlitinum um, hvat var avgerandi fyri nær ammoniumnitrat varð mett at koma undir reglurnar fyri spreingievni eftir tí lóggávu, ið stovnurin umsat, og nær serligt loyvi at innflyta ammoniumnitrat varð kravt.

Arbeiðs- og brunaeftirlitið svaraði, at ammoniumnitrat í sær sjálvum ikki var at skilja sum spreingievni og var ikki sum rávøra fevnt av lógini um spreingievni og spreingiarbeiði. Tað var ikki fyrr enn ammoniumnitrat varð blandað saman við aðrari rávøru eftir ávísum lutfalli, at talan varð um spreingievni, sum var fevnt av nevndu lóggávuni og harvið kom undir myndugleikaøkið hjá Arbeiðs- og brunaeftirlitinum.

Vísandi til ivasama grundarlagið fyri at flokka ammoniumnitrat í vørubólkin um spreingievni, og at tað sambært Arbeiðs- og brunaeftirlitinum ikki var talan um spreingievni, mælti umboðsmaðurin Havnanevndini/Tórshavnar kommunu til at endurskoða gjaldsskránna og vøruskránna við atliti at vørugjaldinum fyri ammoniumnitrati.

MÁL NR. 23/07506 og 23/07513

## Eiðis kommuna ikki røkt sína eftirlitsskyldu í sambandi við dálking

Ein borgari klagaði til umboðsmannin um málsviðgerðina hjá Eiðis kommunu og Umhvørvisstovuni av einari fráboðan um plastdálking hjá einari privatari fyritøku, ið hevur sítt virksemi á Eiði.

Vegna ógegni hjá umboðsmanninum valdi Formansskapurin í Løgtinginum setiumboðsmann at viðgera hesa klagu.

Sambært skjølunum í málinum byrjaði málið í september 2019 í sambandi við, at klagarin vendi sær til Umhvørvisstovuna og gjørdi vart við, at plastdálking varð funnin á keiøkinum og í pørtum av bygdini, sum stavaði frá framleiðsluni av aliringum á havnarlagnum á Eiði.

Umhvørvisstovan kunnaði beinanvegin klagaran um, at sambært § 8 í kunngerð nr. 53 frá 3. mai 1994 um umhvørvisreglur, lá eftirlitið við dálkingini hjá Eiðis kommunu, og at Umhvørvisstovan ikki kundi viðgera tað ítøkiliga málið, tí hon, sambært § 38 í somu kunngerð, er kærumyndugleiki fyri tær avgerðir, sum kommunan fór at taka í málinum.

Umhvørvisstovan greiddi setiumboðsmanninum frá, at síðan Umhvørvisstovan fekk ta fyrstu fráboðanina um plastdálkingina, tann 3. september 2019, hevði hon verið í tøttum samskifti við kommununa um plastdálkingina. Umhvørvisstovan hevði í fleiri umførum boðað kommununi frá, at talan var um umfatandi dálking, og at økið skuldi ruddast. Umhvørvisstovan hevði harumframt vegleitt kommununa um, hvussu viðurskiftini kundu fáast í rættlag.

Setiumboðsmaðurin hevði onki at finnast at viðvíkjandi málsviðgerðini hjá Umhvørvisstovuni í hesum sambandi, men helt tað tó vera óheppið, at Umhvørvisstovan bæði ráðgav og hevði eftirlit við kommunum í umhvørvisspurningum, samstundis sum hon skuldi vera ein óheftur kærumyndugleiki í somu málum.

Setiumboðsmaðurin heitti tí á landsstýriskvinnuna í umhvørvismálum, um at umhugsa at leggja kærumyndugleikan til annan myndugleika at umsita.

Í frágreiðingini frá Eiðis kommunu til málið, vóru, eftir øllum at døma, ongi skjøl skjalførd í málinum fyrr enn tann 12. februar 2022.

Setiumboðsmaðurin helt tað vera alt annað enn nøktandi, at Eiðis kommuna ikki hevði

skjalført skjølini í málinum ella hevði skrivað niður samrøður og fundir, sum kommunan hevði havt við m.a. Umhvørvisstovuna.

Av tí at ongi skjøl vóru í málinum, sum vístu, at Eiðis kommuna hevði røkt sína eftirlitsskyldu ella hevði tikið stig til fyriskipanir, sum skulu forða fyri dálking á økinum, kundi setiumboðsmaðurin ikki annað enn leggja til grund tær upplýsingar, sum vóru fingnar til vega í skjølunum frá Umhvørvisstovuni.

Setiumboðsmaðurin helt, at skjølini í málinum frá Umhvørvisstovuni góvu eina greiða ábending um, at eftirlitið hjá kommununi als ikki hevði verið nøktandi.

Grundað á hetta gav setiumboðsmaðurin Eiðis kommunu eina átalu fyri ikki at hava røkt sína eftirlitsskyldu sambært § 8 í kunngerð nr. 53 frá 3. mai 1994 um umhvørvisreglur.

Í sambandi við klagumálsviðgerðina hjá setiumboðsmanninum var tó greitt, at meginparturin av dálkaða økinum eftirfylgjandi varð ruddað, og at tað nú tyktist sum, at kommunan framdi sítt eftirlit á nøktandi hátt. Setiumboðsmaðurin gjørdi tískil ikki meira við málið, men heitti á kommununa um at lata seg frætta, nær restin av plastdálkingini fór at verða beind burtur. Harafturat mælti setiumboðsmaðurin Eiðis kommunu til at gera eina fyriskipan um slíkt dálkandi virksemi, sum við jøvnum millumbilum verður eftirmett.

*Uppfylging*
Eftir hetta sendi Eiðis kommuna setiumboðsmanninum frágreiðingar frá trimum eftirlitsvitjanum, ið kommunan hevði framt síðani álitið varð latið úr hondum. Frágreiðingarnar vístu, at framstig vórðu gjørd í sambandi við at fáa loyst trupulleikan við dálking, men at ávís tiltøk framvegis vóru neyðug. Víst varð á, at kommunan fór at halda áfram við eftirlitsvitjanum á staðnum.

**MÁL NR. 23/10394**

## Runavíkar kommuna fekk álvarsliga átalu fyri handfaringina av eini umsókn um byggiloyvi

Ein borgari vendi sær til umboðsmannin við eini klagu um drúgva málsviðgerðartíð og vantandi kunning frá Runavíkar kommunu í sambandi við eina umsókn um byggiloyvi til neyst.

Klagarin hevði latið Runavíkar kommunu umsókn um loyvi til at byggja neyst í mars 2021 og síðani sent áminningar og fyrispurningar.

Klagan var um sama mál, sum áður varð klagað um tvær ferðir til Løgtingsins umboðsmann. Fyrru ferð varð málið viðgjørt í álitinum LUM 22/08550, dagfest 19. september 2022, har álvarslig átala varð givin Runavíkar kommunu fyri handfaringina av umsóknunum um byggiloyvi til neyst. Umboðsmaðurin vísti í álitinum á, at kommunan hevði skyldu at viðgera umsóknir um byggiloyvi eftir galdandi lóggávu og innan rímiliga tíð.

Í juni 2023 hevði Runavíkar kommuna ikki enn avgreitt umsókn klagarans, hóast klagarin hevði fingið boð um, nær málið fór at verða viðgjørt, og tann dagfestingin var farin framvið.

Klagarin sendi eftir freistina fyrispurningar um umsókn sína til Runavíkar kommunu uttan at fáa svar og vendi sær síðani til umboðsmannin.

Umboðsmaðurin helt, at Runavíkar kommuna beinanvegin átti at kunnað klagaran um støðuna við umsókn hansara, tá hugsað varð um drúgvu málsviðgerðartíðina av málinum og ta grundaðu væntan, sum klagarin hevði um viðgerð av málinum innan ásettu freistina.

Umboðsmaðurin helt tað vera sera átaluvert, at Runavíkar kommuna, hóast álvarsliga átalu í september 2022, enn í juni 2023 ikki hevði viðgjørt umsókn klagarans um byggiloyvi til neyst, og at Runavíkar kommuna í slíkari støðu ikki gjørdi meira fyri at kunna klagaran um støðuna við máli hansara, og nær avgerð kundi væntast. Umboðsmaðurin metti hetta vera sera álvarsamt vansketni í viðgerðini.

Umboðsmaðurin gav Runavíkar kommuna eina sera álvarsliga átalu fyri málið og sendi samsvarandi § 10 í umboðsmanslógini § 10 fráboðan um málið til Løgtingið, løgmann og landsstýrismannin í kommunumálum.

Umboðsmaðurin bað Runavíkar kommunu lata seg frætta, hvat víðari hendi í málinum. Stutt eftir boðaði Runavíkar kommuna frá, at klagarin varð biðin um at senda fleiri tekningar, og at kommunan fór at viðgera málið víðari, tá neyðugu tekningarnar vóru móttiknar.

**MÁL NR. 23/10909**

## Tórshavnar kommuna gav starvsfólki eina ávaring á ófullfíggjaðum grundarlagi

Havnar Arbeiðarafelag klagaði til umboðsmannin vegna ein lim hjá felagnum, ið hevði fingið eina ávaring frá Tórshavnar kommunu.

Ávaringin snúði seg um sýnda atburðin hjá starvsfólkinum, ið Tórshavnar kommuna ikki metti seg kunna góðtaka. Í ávaringini varð tilskilað, at um atburðurin ikki broyttist, kundi talan gerast um uppsøgn av starvsfólkinum.

Umboðsmaðurin viðmerkti, at ein ávaring er eitt álvarsligt setanarrættarligt amboð hjá einum arbeiðsgevara, ið ger, at ein ávaring skal lúka eitt krav um greidleika.

Kravið um greidleika merkir, at ávaringin inniheldur eina ítøkiliga lýsing av tí atburði, ið arbeiðsgevarin ikki er nøgdur við, umframt eina lýsing av, hvussu arbeiðsgevarin ynskir, at starvsfólkið bøtir um síni viðurskifti.

Kravið um greidleika merkir eisini, at ávaringin er somikið greitt og ítøkiliga orðað, at starvsfólkið veruliga hevur møguleika fyri at laga seg eftir ávaringini. Hetta merkir, at starvsfólkið er ført fyri at vita, nær viðkomandi er innanfyri ella uttanfyri karmin av tí, ið ávaringin fyriskipar.

Umboðsmaðurin helt samanumtikið, at ávaringin var soleiðis orðað, at hon ikki leyk kravið um greidleika.

Í ávaringini vórðu eisini ávís viðurskifti lýst sum brot á sonevndu lýdnisskylduna. Talan var um ávísa útsøgn hjá starvsfólkinum mótvegis leiðsluni, umframt at viðkomandi starvsfólk áhaldandi hevði sýtt fyri at arbeiða.

Galdandi er, at ein arbeiðsgevari kann krevja, at starvsfólk, meðan tey eru í starvi, eru samstarvsfús og lýðin móti leiðslu og arbeiðsplássi sínum. Lýdnisskyldan er galdandi bæði í og uttan fyri arbeiðstíð.

Sum ein liður í lýdnisskylduni móti arbeiðsplássinum mugu starvsfólk metast at hava bæði rætt og skyldu til at boða leiðsluni frá viðurskiftum, sum ikki eru nøktandi. Hetta skal tó verða gjørt á ein sømiligan hátt og uttan at nýta ein ov harðan ella grovan málburð, sum kann skaða viðurskiftini á arbeiðsplássinum.

Umboðsmaðurin helt samanumtikið, at Tórshavnar kommuna ikki hevði víst á slík faktisk viðurskifti, ið góvu umboðsmanninum orsøk at halda, at viðkomandi starvsfólk hevði brotið sína lýdnisskyldu.

Umboðsmaðurin heitti á Tórshavnar kommunu um at endurskoða avgerðina at geva viðkomandi starvsfólki eina ávaring og lata seg frætta, hvat víðari hendi í málinum.

*Uppfylging*
Tórshavnar kommuna kunnaði eftir hetta umboðsmannin um, at kommunan hevði havt fund við starvsfólkið saman við Havnar Arbeiðarafelag, har kunnað varð um, at ávaringin varð tikin aftur, men at málið varð byrjað av nýggjum.

MÁL NR. 23/12333

## Uttanríkis- og vinnumálaráðið sýtti KVF innlit í ov nógv brot í frágreiðingina um viðurskiftini við Russland, og innlitið, ið varð játtað, varð ikki givið á nóg greiðan hátt

Ein fjølmiðil klagaði um handfaringina hjá Uttanríkis- og vinnumálaráðnum av eini umsókn um innlit í frágreiðingina um viðurskiftini við Russland.

Í fyrstu syftu varð einki innlit givið, men undir viðgerðini játtaði Uttanríkis- og vinnumálaráðið partvíst innlit.

Tá málið byrjaði, metti Uttanríkis- og vinnumálaráðið, at útflýggjan av skjalinum í síni heild kundi elva til týðandi skaða fyri uttanríkispolitisku áhugamál Føroya, har ímillum samráðingarstøðu Føroya og viðurskiftini við onnur lond. Víst varð eisini til § 13, stk. 1 nr. 2 og 6 í innlitslógini og atlit at politisku avgerðartilgongdini í sambandi við eitt lógarmál. Eisini metti ráðið, at atlitini, sum lógu til grund fyri, at undantaka upplýsingarnar frá innliti í hesum føri talaðu ímóti at geva meirinnlit eftir reglunum í § 4 stk.1, 2. pkt.

Umboðsmaðurin var samdur við Uttanríkis- og vinnumálaráðnum í, at undir nevndu viðurskiftum var heimild at sýta fyri at lata innlit í alla frágreiðingina.

Tá fortreytirnar fyri at sýta innlitið broyttust, læt ráðið klagaranum partvíst innlit. Umboðsmaðurin metti, at ráðið hevði sýtt innlit í óneyðuga nógv brot í frágreiðingini. Umboðsmaðurin vísti í hesum sambandi á, at brot í frágreiðingini innihildu upplýsingar um faktuell viðurskifti og alment atkomuligar upplýsingar, sum - nú atlitið at politisku avgerðartilgongdini ikki var aktuelt longur – ikki kundu undantakast frá innliti vegna verju av uttanríkispolitiskum ella uttanríkisfíggjarligum áhugamálum.

Umboðsmaðurin staðfesti eisini, at innlitið varð givið á ógreiðan hátt, og at feilir vóru í innlitinum, tí í fleiri støðum var uppsetingin av upprunatekstinum broytt, tá teksturin varð drigin út – t.e. reglubrot vóru fallin út, og yvirskriftir og undiryvirskriftir sóust ikki sum yvirskriftir. Samsvar var heldur ikki millum innlitið, sum varð givið í innihaldsyvirlitið, og tekstin, sum varð tikin úr frágreiðingini.

Umboðsmaðurin bað Uttanríkis- og vinnumálaráðið taka málið upp til nýggja viðgerð og lata seg frætta, hvat víðari hendi í málinum.

*Uppfylging*
Tann 18. august 2023 kunnaði Uttanríkis- og vinnumálaráðið umboðsmannin um, at ráðið hevði tikið málið upp til nýggja viðgerð og sent KVF nýggja avgerð, har innlit var givið í størri part av frágreiðingini enn frammanundan. Upplýst varð, at ekstraheringin av tí parti av frágreiðingini, sum innlit ikki varð latið í, varð gjørd av nýggjum og nú á sama hátt í øllum skjalinum.

Ráðið viðmerkti, at tað framvegis metti, at hóast talan í summum førum var um upplýsingar, sum í sær sjálvum kundu roknast at vera faktuell viðurskifti og sum vóru alment atkomuligar, hevði útflýggjan av tilfarinum avdúkað ein samanhang, sum hevði elvt til týðandi skaða fyri uttanríkispolitisku ella uttanríkisfíggjarligu áhugamál Føroya. Uttanríkis- og vinnumálaráðið metti, at útflýggjan av hesum upplýsingunum kundi elva til týðandi skaða fyri viðurskiftini við eitt nú onnur lond. Í nýggju avgerðini varð tí framvegis ikki givið innlit í hesar partar av skjalinum.

**MÁL NR. 23/13510**

## Runavíkar kommuna fekk eina átalu fyri handfaringina av einum fyrispurningi um eitt byggimál

Ein borgari klagaði um, at Runavíkar kommuna ikki svaraði hansara fyrispurningi um eitt byggimál.

Borgarin hevði við teldupostum javnan yvir 2 ár spurt Runavíkar kommunu, íroknað eitt starvsfólk hjá kommununi og nakrar býráðslimir, um byggiloyvi kravdist til ta bygging, sum granni hansara var í gongd við millum hús teirra, og um hann hevði fingið loyvi frá kommununi til hesa bygging.

Hóast teldupostarnar til kommunu, starvsfólk og býráðslimir, so segði kommunan seg ikki kennast við málið, og at málið var ikki skrásett í journalini og ikki viðgjørt.

Umboðsmaðurin vísti á, at sum meginregla hevur kommunan, sum almennur myndugleiki, skyldu at svara fyrispurningum frá borgaranum og at avgreiða mál skjótast gjørligt. Eisini vísti umboðsmaðurin á, at ein kommuna hevur skyldu til at hava slíkan røkiskap í síni skjalagoymslu, at til ber at prógva, hvørji skjøl eru í einum máli, og hvør viðgerð er farin fram.

Vísandi til at fyrispurningurin frá borgaranum var av slíkum slag, sum kravdi eina málsviðgerð og svar frá kommununi, helt umboðsmaðurin tað ikki vera nøktandi fyrisiting, at fyrispurningurin hevði ligið ósvaraður í gott tvey ár. Umboðsmaðurin helt eisini, at tað var als ikki nøktandi, at kommunan ikki tyktist at hava greiðu á, hvat var hent við málinum.

Samanumtikið gav umboðsmaðurin Runavíkar kommunu eina átalu fyri ikki at hava handfarið málið nøktandi.

MÁL NR. 23/13716

## Runavíkar kommuna fekk eina átalu fyri handfaringina av eini innlitsumbøn frá einum borgara

Ein borgari klagaði um, at Runavíkar kommuna ikki svaraði hansara umbøn um innlit í ávís mál.

Innlitsumbønin varð send kommununi tann 20. mai 2023. Kommunan svaraði ikki umbønini um innlit fyrr enn 7. juli 2023 og sendi onga kunning um, at málið ikki kundi avgreiðast innan 10 dagar og hví.

Umboðsmaðurin vísti á, at í § 16, stk. 2 í innlitslógini er ásett, at er ein áheitan um skjalainnlit ikki gingin á møti ella noktað innan 10 dagar eftir, at viðkomandi myndugleiki hevur móttikið hana, skal myndugleikin boða viðkomandi frá um orsøkina til hetta, og nær ein avgerð væntandi verður til skjals.

Tá umboðsmaðurin bað um frágreiðing og skjølini í málinum, svaraði kommunan heldur ikki rættstundis. Tað varð tí neyðugt at senda eina áminning fyri at fáa svar sum umbiðið.

Umboðsmaðurin gav Runavíkar kommunu eina átalu fyri handfaringina av málinum.

MÁL NR. 23/14461

## Runavíkar kommuna fekk eina átalu fyri handfaringina av eini innlitsumbøn frá einum fjølmiðli

Ein fjølmiðil klagaði um, at Runavíkar kommuna ikki svaraði eini umbøn um alment innlit í eitt mál um ávíst byggiloyvi.

Innlitsumbønin varð send kommununi tann 20. juni 2023. Kommunan svaraði ikki umbønini um innlit fyrr enn 20. juli 2023 og sendi onga kunning um, at málið ikki kundi avgreiðast innan 10 dagar og hví.

Umboðsmaðurin vísti á, at í § 16, stk. 2 í innlitslógini er ásett, at er ein áheitan um skjalainnlit ikki gingin á møti ella noktað innan 10 dagar eftir, at viðkomandi myndugleiki hevur móttikið hana, skal myndugleikin boða viðkomandi frá um orsøkina til hetta, og nær ein avgerð væntandi verður til skjals.

Tá umboðsmaðurin bað um frágreiðing og skjølini í málinum, svaraði kommunan heldur ikki rættstundis, og varð tí neyðugt at senda tvær áminningar fyri at fáa svar sum umbiðið.

Umboðsmaðurin gav Runavíkar kommunu eina átalu fyri handfaringina av málinum.

MÁL NR. 23/18452

## Heilsumálaráðið fekk eina álvarsliga átalu fyri handfaringina av eini innlitsáheitan frá KVF og klagumálsupplýsingina av innlitsmálinum

Kringvarpið klagaði um vantandi innlit í eina átalu og grundarlagið fyri átaluni.

Tann 29. juni 2023 bað KVF Heilsumálaráðið um innlit í eina átalu, sum eitt navngivið starvsfólk í leiðsluni í Sjúkrahúsverkinum hevði fingið á fundi í Heilsumálaráðnum tann 16. juni 2023 og innlit í grundarlagið fyri átaluni.

Tann 4. juli 2023 svaraði Heilsumálaráðið, at ongin átala varð givin á fundinum tann 16. juni 2023. Ráðið viðmerkti, at KVF eisini hevði biðið um innlit í frásøgnina frá hesum fundi, men at hendan ikki var endaliga góðkend. Tá fundarfrágreiðingin varð góðkend, fekk KVF innlit í frágreiðingina.

Eftir at umboðsmaðurin hevði fingið frágreiðingar og viðkomandi skjøl frá Heilsumálaráðnum, kundi umboðsmaðurin staðfesta, at viðkomandi starvsfólk hevði fingið eina átalu frá Heilsumálaráðnum tó ikki á fundinum 16. juni 2023, men á fundi nakrar dagar frammanundan. Eisini kundi umboðsmaðurin staðfesta, at á fundinum 16. juni 2023 varð kunnað um hesa ávaring, men at kunningin ikki varð endurgivin í fundarfrásøgnini frá fundinum.

Umboðsmaðurin metti, at hóast KVF hevði víst á skeivan fund, hevði KVF eyðmerkt málið/skjalið á slíkan hátt, at Heilsumálaráðið visti, hvat mál/skjal talan var um, og at ráðið tí av røttum ikki kundi nokta innlit við at vísa til, at ávaringin ikki varð givin á nevnda fundi. Umboðsmaðurin bað tí Heilsumálaráðið taka málið upp til nýggja viðgerð.

Umboðsmaðurin viðmerkti, at í byrjanini av málinum var klagumálsupplýsingin frá Heilsumálaráðnum so avmarkað, at hetta kundi tulkast sum vantandi vilji at upplýsa klagumálið nøktandi fyri umboðsmanninum.

Umboðsmaðurin helt, at framferðin hjá Heilsumálaráðnum í hesum máli var ikki í samsvari við endamálið við innlitslógini um at virka fyri gjøgnumskygni og opinleika í umsitingini. Av hesum avgjørdi umboðsmaðurin at geva Heilsumálaráðnum eina álvarsliga átalu fyri handfaringina av málinum og sendi samsvarandi § 10 í umboðsmanslógini fráboðan um málið til Løgtingið, løgmann og landsstýriskvinnuna í heilsumálum.

*Uppfylging*
Tann 22. desember 2023 boðaði Heilsumálaráðið frá, at tey tóku niðurstøðuna frá umboðsmanninum, um at innlitsumbønin varð skeivt viðgjørd, til eftirtektar, og at ráðið hevði viðgjørt málið av nýggjum og givið KVF innlit í umbidnu skjølini.



# 5 Frágreiðingar

Umboðsmaðurin kann taka mál upp av egnum ávum og fremja neyðugar kanningar í hesum sambandi. Umboðsmaðurin kann kanna allar stovnar, myndugleikar og tænastustøð, sum eru fevnd av sínum virkisøki. Hann hevur rætt til at vitja støð, ið kannað verða, og hevur fría atgongd til at gera kanningar í øllum neyðugum hølum.

Umboðsmaðurin kann kanna eitt mál, uttan at tað finst nøkur klaga hesum viðvíkjandi. Umrøða í fjølmiðlunum kann t.d. hava við sær, at umboðsmaðurin gerst varugur við viðurskifti, sum hann ynskir at kanna nærri. Onkuntíð kunnu klagur vera orsøk til, at umboðsmaðurin gerst varugur við viðurskifti, sum ikki beinleiðis er klagað um, men sum hann ynskir at kanna nærri.

Niðanfyri eru dømir um mál, sum umboðsmaðurin hevur kannað og skrivað eina frágreiðing um.

**MÁL NR. 22/12208**

## Kanning av eftirlitsvitjanum hjá barnaverndartænastunum

Umboðsmaðurin kannaði, um barnaverndartænasturnar gera tær eftirlitsvitjanir og hava tær barnasamrøður við børn, sum eru sett heiman, sum eru ásettar í § 16, stk. 3 í Barnaverndarlógini. Samanumtikið helt umboðsmaðurin, at tað alt ov ofta kom fyri í kannaða tíðarskeiðinum, at barnaverndartænasturnar ikki hildu ásettu freistina fyri eftirlitsvitjanir og barnasamrøður.

Sambært ásetingini § 16, stk. 3 skal barnaverndartænastan gera minst tvær árligar eftirlitsvitjanir hjá børnum, sum eru sett heiman, har barnaverndartænastan tosar við barnið, helst í einrúmi. Kanningin vísti, at í summum førum vóru ár millum eftirlitsvitjanir og/ella barnasamrøður. Í onkrum førum høvdu ongar eftirlitsvitjanir og/ella barnasamrøður verið.

Umboðsmaðurin vísti á, at hetta als ikki var nøktandi, tá hugsað varð um, at endamálið við eftirlitsvitjanum og barnasamrøðum er at tryggja, at fyriskipanin at seta barnið heiman virkar eftir ætlan, og at barnið hevur tað gott og trívist og mennist í fyriskipanini.

Umboðsmaðurin kom m.a. við tilmælum um:
- at barnaverndartænasturnar hava barnasamrøður við barnið, har barnið býr.
- at barnaverndartænasturnar gera eygleiðingar av barninum og skriva eygleiðingarnar niður, um ikki ber til at fáa í lag samrøðu við barnið, t.d. vegna aldur á barninum ella menningartarn.
- at barnaverndartænasturnar, saman við avvarðandi myndugleika, gera ein felags leist fyri, hvussu eftirlitsvitjanir skulu skipast, og hvat innihaldið í barnasamrøðunum skal vera.

- at barnaverndartænasturnar tryggja góðskuna á uppritunum frá eftirlitsvitjanum, t.d. við at gera ein frymil fyri, hvat í minsta lagi skal standa í uppritunum.
- at barnaverndartænasturnar hava eina áminningarskipan, soleiðis at eftirlitsvitjanir og barnasamrøður verða framdar í minsta lagi 6. hvønn mánað.
- at avvarðandi kommunur meta um, hvørt arbeiðstrýstið er ov stórt á barnaverndartænasturnar, og um so er, hvussu hesin trupulleikin kann loysast.

MÁL NR. 22/20549

## Kanning av eftirlitinum við eldraøkinum

Umboðsmaðurin kannaði, hvat eftirlit hevði verið við tænastunum á eldraøkinum, síðani tað varð lagt út til kommunurnar. Umboðsmaðurin staðfesti, at hóast tað í eldralógini var ásett, at kommunurnar skulu hava eftirlit við teimum tænastum, sum tær veita sambært eldralógini, var einki eftirlit skipað síðan økið var lagt út til kommunurnar 1. januar 2015. Umboðsmaðurin metti, at vantandi reglur frá Almannamálaráðnum vóru orsøk til hesa støðu, og sendi tí skriv til Almannamálaráðið, har hann mælti ráðnum til sum skjótast at gera reglur um eftirlit til kommunurnar at fyrisita eftir.

Sambært § 19 stk. 1 í eldralógini hava kommunurnar eftirlit við bústøðum, tænastum og tilboðum sambært eldralógini, og skuldu kommunurnar og kommunalu samstørvini áðrenn 1. mai 2014 boðað landsstýrismanninum frá, á hvønn hátt hetta eftirlit fór at verða skipað. Hetta var í sambandi við at eldraøkið skuldi leggjast út til kommunurnar at umsita 1. januar 2015.

Í avtalunum, sum kommunurnar í 2014 sendu Almannamálaráðnum til góðkenningar, vístu kommunurnar á, at eftirlitið hjá kommununum varð skipað sambært galdandi lógum og reglum ella sambært ætlaðu kunngerð sambært § 19, stk. 3 í eldralógini, sum er heimildin hjá landsstýrismanninum at áseta reglur um eftirlit. Almannamálaráðið hevði tó hvørki tá ella seinni lýst nakrar reglur um eftirlitið hjá kommununum.

Umboðsmaðurin metti, at vantandi reglur frá Almannamálaráðnum vóru orsøk til hesa støðu. Umboðsmaðurin sendi tí skriv til Almannamálaráðið, har hann mælti ráðnum til sum skjótast at gera reglur um eftirlit til kommunurnar at fyrisita eftir.

Almannamálaráðið boðaði eftir hetta umboðsmanninum frá, at ætlanin var at fara undir at gera eina kunngerð til kommunurnar um eftirlit á eldraøkinum eftir summarfrítíðina.

*Uppfylging*
Tann 21. des. 2023 minti umboðsmaðurin Almanna- og mentamálaráðið á málið.

Tann 19. januar 2024 svaraði Almanna- og mentamálaráðið, at arbeiðið við at gera eina kunngerð um eftirlit á eldraøkinum ikki var farið í gongd.
Ætlanin hevði verið at umrøða málið við kommunurnar og gera eina kunngerð, men orsakað av stórari arbeiðsbyrðu í ráðnum, hevði hetta ikki latið seg gjørt.
Almanna- og mentamálaráðið var í gongd við at finna ein fundardag, har øll eftirmetingin av eldraøkinum skuldi umrøðast við kommunurnar, harundir eisini manglandi eftirlitið á økinum.

MÁL NR. 22/22424

## Fyrisitingarliga mannagongdin hjá Heilsumálaráðnum í sambandi við setan av Etiska Ráðnum var ikki nøktandi.

Umboðsmaðurin tók mál upp av egnum ávum um fyrisitingarligu mannagongdina hjá Heilsumálaráðnum, tá nýtt Etiskt ráð varð sett á heysti 2022. Umboðsmaðurin helt ikki fyrisitingarligu mannagongdina vera nøktandi ella í samsvari við góðan fyrisitingarsið. Umboðsmaðurin mælti Heilsumálaráðnum til hereftir at biðja tilmælandi partarnar um at lýsa útbúgvingar og royndir hjá teimum persónum, sum verða skotnir upp til limir í Etiska ráðið.

Umboðsmaðurin mælti eisini til, at Heilsumálaráðið tryggjar, at landsstýrismaðurin tekur avgerð sína á upplýstum grundarlagi, og at hetta sæst aftur í uppriti viðvíkjandi valinum av limum til Etiska ráðið.

Í sambandi við kanning av skjølunum í málinum, har nýtt Etiskt ráð var sett á heysti 2022, bað umboðsmaðurin Heilsumálaráðið greiða sær frá:

- Hví Heilsumálaráðið ikki hevði biðið teir ymisku partarnar, sum skuldu koma við tilmælum um limir til Etiska ráðið, lýsa, hvørjar førleikar teir persónar, sum vóru skotnir upp, høvdu til júst hesa uppgávuna.
- Hví tilmælið frá umsitingini í Heilsumálaráðnum til landsstýrismannin í heilsumálum ikki ráðgav landsstýrismannin um, hvørjir av persónunum, sum vóru skotnir upp, vóru best skikkaðir at sita í Etiska ráðnum, og við hvørjum persónum Etiska ráðið best hóskandi varð samansett.
- Hví upprit frá fundi við landsstýrismannin í heilsumálum onga grundgeving hevði fyri, hví landsstýrismaðurin valdi júst hesar limirnar í Etiska ráðið, og hví Etiska ráðið var samansett júst soleiðis, sum tað var.

Heilsumálaráðið svaraði umboðsmanninum, at ongin almennur politikkur ella fyrisitingarligar mannagongdir eru galdandi, tá ið ráð og nevndir skulu setast av landsstýrinum, og at Heilsumálaráðið ikki hevur havt til siðvenju og metti tað ikki vera rætt at fylgja setanarpolitikki landsstýrisins og teimum fyrisitingarligu mannagongdum, sum har eru orðaðar, tá ið ráð og nevndir skulu setast.

Heilsumálaráðið metti, at tilmælandi partarnir vóru greiðir yvir, at persónarnir í uppskoti til limir í Etiska ráðið skuldu hava ávísar førleikar. Tí bað Heilsumálaráðið ikki um nærri grundgeving fyri, hví júst hesir persónar vóru í uppskoti.

Heilsumálaráðið vísti á, at sambært lóggávuni er tað landsstýrismaðurin, sum setur Etiska ráðið. Heilsumálaráðið hevur ikki havt til siðvenju at ráðgeva landsstýrismannin um, hvørjar persónar hann ítøkiliga skuldi velja, fyri at Etiska ráðið var best hóskandi samansett. Heilsumálaráðið metti tað ikki vera neyðugt, at landsstýrismaðurin í uppriti grundgav fyri, hví hann valdi júst teir limir, sum hann valdi, og hví Etiska ráðið var samansett júst soleiðis, sum tað var.

Umboðsmaðurin vísti á, at serligu viðmerkingarnar til § 6 í lógini um Etiskt ráð hava rættuliga nágreinilig dømi um, hvørjar førleikar limirnir í Etiska ráðnum skulu hava.

Umboðsmaðurin helt tað ikki vera nøktandi fyrisitingarliga mannagongd og ikki í samsvari við góðan fyrisitingarsið, at Heilsumálaráðið lat vera við at biðja tilmælandi partarnar um at lýsa førleikarnar hjá teimum persónum, sum teir skutu upp til limir í Etiska ráðið.

Umboðsmaðurin helt tað heldur ikki vera nøktandi ella í samsvari við góðan fyrisitingarsið, at tilmælið frá umsitingini ikki var soleiðis háttað, at landsstýrismaðurin kundi taka avgerð sína á upplýstum grundarlagi, og at einki skjalprógv var fyri, hví landsstýrismaðurin valdi at samanseta Etiska ráðið 2022-2026 júst soleiðis, sum tað var.



MÁL NR. 23/05988

## Í framhaldi av eini klagu umhugsaði umboðsmaðurin mál av egnum ávum viðvíkjandi skylduni hjá kommununum at veita skúlabørnum ansing, tá skúlafrí er.

Í § 3, stk. 2 í dagstovnalógini er ásett, at dagstovnar og dagrøktir hava opið gerandisdagar í dagtímunum. Sambært § 3, stk. 1 í dagstovnalógini fevnir hugtakið "dagstovnur" eisini um m.a. frítíðarheim/frítíðarskúlar.

Umboðsmaðurin sendi fyrispurning til Barna- og útbúgvingarmálaráðið um , hvussu ráðið tulkar § 3, stk. 2 í dagstovnalógini, og hvørjar skyldur ráðið metir, at ásetingin áleggur kommununum í sambandi við upplatingartíðir hjá frítíðarheimum/frítíðarskúlum.

Barna- og útbúgvingarmálaráðið greiddi frá, at teirra fatan er, at frítíðarskúlar/ frítíðarheim á ein heilt serligan hátt eru tengdir at skúla og skúlagongd. Upplating av hesum tilboði kann tí eisini fylgja skúlatíð.

Barna- og útbúgvingarmálaráðið vísti harumframt á, at dagstovnalógin skal dagførast í næstum, og tá verður § 3, stk. 2 um upplatingartíðir eisini viðgjørd og nágreinað, so ivi ikki verður um, hvat greinin inniber.

Umboðsmaðurin var ikki samdur í hesi tulking av § 3, stk. 2 í dagstovnalógini. Umboðsmaðurin helt, at tá ið frítíðarheim av løggávuvaldinum eru sett inn í dagstovnalógina, mugu tey metast at vera umfatað av § 3, stk. 2 um, hvussu dagstovnar hava opið, uttan so at serligar ásetingar ella undantøk eru gjørd viðvíkjandi teirra upplatingartíðum.

Um so var, at ásetingin um at hava opið gerandisdagar einans skuldi umfata skúladagar í mun til frítíðarheim, átti tað at vera greiðari ásett í lógini, at frítíðarheim eru tengd at fólkaskúlanum og frídøgunum har.

Umboðsmaðurin kunnaði Barna- og útbúgvingarmálaráðið um hetta, men gjørdi ikki meira við málið við tað, at Barna- og útbúgvingarmálaráðið hevði upplýst, at dagstovnalógin skuldi dagførast í næstum.

MÁL NR. 23/07090

## Kanning av innlitsmálum hjá størru kommununum

Umboðsmaðurin kannaði viðgerðina av málum um alment innlit hjá størru kommununum.

Í kanningini vórðu tilsamans 84 mál gjøgnumgingin.

Endamálið við kanningini var at kanna, hvussu størru kommunurnar handfara 10 daga regluna í innlitslógini, hvussu mál um innlit verða skrásett, viðgerðartíðina, og hvussu kommunurnar nokta innliti.

Samanumtikið helt umboðsmaðurin, at borgarar sum meginregla fáa tað innlit, ið teir biðja um frá kommununum, og at kommunurnar royna at avgreiða innlitsumbønirnar sum skjótast. Umboðsmaðurin helt tó, at tað tyktist at vera ein afturvendandi trupulleiki, at kommunurnar gloyma at kunna borgaran, tá tær ikki avgreiða innlitsumbønina innan 10 dagar. Eisini helt umboðsmaðurin, at sjálv avgreiðslan av innlitinum oftani ikki var nóg greið, tí borgarin sær ikki á svarinum frá kommununi, um hann hevur fingið fult ella bara partvíst innlit.

Í kanningini varð dentur lagdur á at fáa eina heildarmynd av viðgerðini hjá kommunum av innlitsumbønum, og at vísa á møguligar skipanarligar feilir og óhepnar mannagongdir. Rættleikin av einstøku avgerðunum varð ikki viðgjørdur.

Flestu málini í kanningini vóru viðgjørd av kommununum í tíðarskeiðinum 2020 - 2023. Tó vóru einstøk mál eldri. Sambært kommununum komst hetta av, at neyðugt hevði verið at leita fleiri ár aftur í tíðina fyri yvirhøvur at finna mál, har myndugleikin heilt ella partvís hevði sýtt at geva innlit og í onkrum føri komst hetta av, at kommunan hevði móttikið so fáar innlitsumbønir síðstu árini.

Grundað á gjøgnumgongdina av teimum 84 málunum hevði umboðsmaðurin fylgjandi viðmerkingar og tilmæli:

*Skráseting*
Allar kommunurnar skrásettu innlitsáheitanirnar í sjálvstøðug mál. Hetta gjørdi tað lætt at leita málini fram, og er hetta eisini ein týðandi fortreyt fyri at kunna gera eina slíka kanning sum hesa hjá umboðsmanninum.

*Málsviðgerðartíðin*
Yvirhøvur var málsviðgerðartíðin stutt. Í flestu førum bert nakrar fáar dagar. Tað vóru tó eisini fleiri mál har 10 daga freistin í § 16, stk. 2 í innlitslógini ikki var hildin. Umboðsmaðurin minti tí kommunurnar á, at ein innlitsumbøn skal avgreiðast sum skjótast, og er umbønin ikki svarað innan 10 dagar, skal kommunan boða umsøkjaranum frá um orsøkina til hetta, og nær ein avgerð kann væntast.

*Samskiftisháttur*
Flestu innlitsáheitanirnar vóru frá privatpersónum, men nakrar vóru eisini frá fjølmiðlum. Samskift varð aloftast umvegis teldupost, og innlitið var eisini aloftast latið talgilt. Har ynski var um at fáa skjølini í pappírsavriti, fekk borgarin boðið at koma á kommunuskrivstovuna eftir skjølunum.

*Gjald fyri innlit*
Flestu kommunur høvdu ikki kravt gjald fyri at lata innlit. Tær kommunur, sum høvdu kravt gjald, vístu til kunngerð nr. 198 frá 15. desember 1993 um gjald fyri avrit og fotoavrit eftir lógini um innlit í fyrisitingina sum heimild fyri gjaldinum. Ein kommuna kravdi, at rokningin fyri innlitið var goldin, áðrenn skjølini vórðu latin umsøkjaranum.

Í sambandi við viðurskiftini við gjaldi fyri innlit sendi umboðsmaðurin Løgmálaráðnum fyrispurning um kunngerðina um gjald (t.e. um gjald er eitt krav ella møguleiki, forútgjalding og talgilt innlit).

Umboðsmaðurin viðmerkti yvirfyri viðkomandi kommunu, at hann helt, at sum meginregla skal gjald fyri innlit ikki krevjast sum forútgjalding.

*Ófullfíggjaði svar*
Í sambandi við gjøgnumgongdina av málunum legði umboðsmaðurin í nøkrum førum til merkis, at hóast tað framgekk av málsskjølunum, at viðkomandi ikki fekk fult innlit, so framgekk tað ikki av avgerðini til borgaran, hvørji skjøl ella upplýsingar, myndugleikin hevði sýtt fyri at lata innlit í, umframt at hetta heldur ikki var gjørt greitt yvirfyri borgaranum. Í øðrum førum legði umboðsmaðurin til merkis, at málini vóru avgreidd á ein slíkan hátt, at borgarin ikki sá, um myndugleikin hevði givið innlit í øll skjølini í málinum, ella um nøkur skjøl ella upplýsingar vóru undantiknar.

Umboðsmaðurin mælti kommununum til at gera avgerðarskrivini um innlit greiðari.

*Fyrisitingarlig krøv til avgerðina*
Í nøkrum av kannaðu málunum manglaði ein grundgeving fyri at nokta innlit og í nøkrum førum var grundgevingin ikki nøktandi.

Umboðsmaðurin viðmerkti, at eitt mál, har søkt verður um innlit eftir innlitslógini, er eitt vanligt fyrisitingarmál, og reglurnar í fyrisitingarlógini eru galdandi fyri viðgerðina av málinum. Gevur ein myndugleiki ikki innlit í øll tey skjøl ella upplýsingar, sum søkt verður um innlit í, er talan um eina avgerð, sum ikki til fulnar gongur partinum á møti. Sambært fyrisitingarlógini hevur myndugleikin í slíkum førum skyldu til at grundgeva fyri sínari avgerð. Tað hevur m.a. stóran týdning fyri borgaran ella tíðindafólkið, tá gerast skal av, um ein avgerð skal kærast, hvør grundgevingin er fyri, at avgerðin ikki til fulnar gekk viðkomandi á møti. Eisini er tað av avgerandi týdningi, at myndugleikin í sambandi við eina møguliga kæruviðgerð kann skjalprógva viðgerðina av málinum.

Manglar ein grundgeving fyri eini noktandi avgerð, er talan um grundleggjandi og týðandi tátt, sum vantar í málsviðgerðini. Myndugleikin skal týðiliga greiða frá, at innlit verður ikki givið í skjøl ella upplýsingar, eins og greiðast skal frá orsøkini til hetta.

Við tað at talan ikki var um fleiri av hesum dømum hjá somu kommunu, metti umboðsmaðurin, at talan var ikki um ein umfatandi trupulleika. Umboðsmaðurin mælti

tó kommununum til framyvir at taka atlit at kravinum um grundgeving, tá tað ikki verður játtað fult innlit.

*Er talan um innlitsmál ella fyrispurning*
Fleiri av málunum, sum kommunurnar høvdu latið umboðsmanninum, vístu seg at vera fyrispurningar og ikki mál um innlit. Umboðsmaðurin helt, at tað sýntist sum kommunurnar ikki altíð gjørdu sær greitt, um áheitanin frá borgaranum veruliga var ein innlitsumbøn, ella um talan var um ein fyrispurning. Fleiri fyrispurningar vóru tí av órøttum skrásettir sum innlitsmál.
Umboðsmaðurin viðmerkti, at innlitslógin er galdandi, tá søkt verður um skjalainnlit t.v.s. innlit í verandi skjøl og mál hjá myndugleikanum, meðan spurningar um ymisk viðurskifti hjá kommununi eru vanligir fyrispurningar, sum ikki eru fevndir av innlitslógini.

Umboðsmaðurin mælti í hesum sambandi viðkomandi kommunum til at gera eina neyvari kanning og skráseting av málunum í sambandi við móttøku av innlitsumbønum og fyrispurningum.

*Mannagongdir fyri innlitsmál*
Tað vóru ikki allar kommunur, sum høvdu gjørt sær vegleiðing ella mannagongdir um viðgerðina av innlitsmálum.

Umboðsmaðurin viðmerkti, at skrivaðar mannagongdir/vegleiðingar og møguliga tilknýtt standarskriv, sum viðgera høvuðstættirnar í eini innlitsviðgerð, kunnu bæði lætta og betra um málsviðgerðina.

Umboðsmaðurin mælti teimum kommunum, sum ikki longu høvdu gjørt mannagongd/vegleiðing á hesum øki, til at gera skrivliga mannagongd ella vegleiðing fyri viðgerðina av innlitsmálum.

*Samanumtøka*
Alt í alt hevði umboðsmaðurin ta fatan, at borgarar sum meginregla fáa tað innlit, ið teir biðja um frá kommununum, og at kommunurnar royna at avgreiða innlitsumbønirnar sum skjótast.
Umboðsmaðurin helt tó, at tað tykist at vera ein afturvendandi trupulleiki, at kommunurnar gloyma at kunna borgaran, tá tær ikki klára at avgreiða innlitsumbønina innan 10 dagar.

Eisini helt umboðsmaðurin, at sjálv avgreiðslan av innlitinum oftani ikki var nóg greið, tí borgarin sá ikki á svarinum frá kommununi, um hann hevði fingið fult ella bara partvíst innlit.


ØLA
REYÐI

# 6 Avvístar klagur

Orsøkin til, at umboðsmaðurin ikki viðger eina klagu, kann vera av formligum slag, so sum at klagan kemur ov seint, ella at ovasti myndugleiki á økinum ikki hevur tikið endaliga avgerð í málinum. Flestu klagur verða tó avvístar ella ikki viðgjørdar, tí umboðsmaðurin ikki metir seg hava nakað grundarlag fyri at gera meira við klaguna.

Niðanfyri eru dømir um mál, sum umboðsmaðurin hevur valt at avvísa av ymiskum orsøkum.

**Umboðsmaðurin kann einans viðgera mál, sum eru viðgjørd av myndugleikum ella stovnum, sum hoyra til almennu fyrisitingina undir heimastýrinum (Umboðsmanslógin § 4, stk. 1)**

## MÁL NR 23/16845

Umboðsmaðurin fekk eina klagu um, at matrikulstovan (Umhvørvisstovan, mín viðm.) hevði gjørt ein feil, og at matrikulstovan ikki vildi broyta ognarskrásetingina fyri eina ávísa ogn. Í skjølunum sást, at skrásetingin, sum klagarin ynskti broytta, sambært Umhvørvisstovuni, varð gjørd eftir matrikuldómi frá 1983. Skrásetingin í tingbókini varð sostatt gjørd sambært dómi hjá Føroya rætti.

Dómsvaldið er ikki at rokna sum ein partur av almennu føroysku fyrisitingini, og umboðsmaðurin viðger tí ikki avgerðir hjá Føroya rætti. Umboðsmaðurin avvísti tí hesa klaguna, men kunnaði Umhvørvisstovuna um klaguna.

## MÁL NR 23/18206

Ein borgari klagaði til umboðsmannin um millum annað vantandi støðutakan og manglandi ástaðarfund til at sýna garðar hjá Hegnsýnisnevndini í Runavík. Av skjølunum sást, at klagarin hevði vent sær til Hegnsýnisnevndina, og at formaðurin fyri Hegnsýnisnevndina hevði boðað honum frá, at umrødda hegnið ikki hevði verið við í undanfarna hegnsýni. Formaðurin hevði boðað frá, at ivamálini fóru at verða tikin upp av kommununi og Hegnsýnisnevndini.

Umboðsmaðurin vísti á, at avgerðir hjá Hegnsýnisnevndini kunnu skjótast inn fyri Landbúnaðarstevnu og síðani í summum førum til Yvirlandbúnaðarstevnu. Fyri avgerðir hjá Landbúnaðarstevnu merkir hetta, at avgerðirnar ikki bert eru endaligar innan fyrisitingina, men eisini eru endaligar innan dómsvaldið. Bert spurningurin um, hvørt Landbúnaðarstevnan hevur verið kompetent ella ikki í einum máli, kann leggjast fyri Hægstarætt. Við tí í huga, at avgerðirnar frá Hegnsýnisnevndini kunnu kærast til

Landbúnaðarstevnu, har Yvirlandbúnaðarstevnan síðani er evsti kærumyndugleiki, metti umboðsmaðurin tað vera ivasamt, um Hegnsýnisnevndirnar kunnu roknast sum partur av almennu fyrisitingini sambært fyrisitingarlógini. Umboðsmaðurin tók tí ikki málið upp.

## MÁL NR 23/22627

Ein borgari klagaði til umboðsmannin um, at P/F Visit Faroe Islands hevði noktað innlit í svarini í kanningini "Framtíðar ferðavinna, sig tína meining".

Umboðsmaðurin viðmerkti, at sambært § 6 í løgtingslógini um P/F Visit Faroe Islands er løgtingslóg um innlit í fyrisitingina galdandi fyri felagið. Samstundis vísti umboðsmaðurin á, at sambært § 4 í umboðsmanslógini fevnir virksemi umboðsmansins um allar føroyskar myndugleikar og stovnar v.m., sum sambært fyrisitingarlógini verða roknaðir við í almennu fyrisitingina, t.v.s. útinnandi valdið.

P/F Visit Faroe Islands er ikki at rokna sum ein partur av almennu føroysku fyrisitingini, men er harafturímóti eitt partafelag, sum verður stýrt eftir reglunum í partafelagslógini við teimum tillagingum, sum eru ásettar í lógini. Sambært viðmerkingunum til lógina um P/F Visit Faroe Islands hevur hetta við sær, at virksemið hjá P/F Visit Faroe Islands ikki er fevnt av fyrisitingarlóg og løgtingslóg um Løgtingsins umboðsmann. Umboðsmaðurin kundi tí ikki viðgera klaguna um P/F Visit Faroe Islands.

Av tí at P/F Visit Faroe Islands ikki var at rokna sum partur av almennu føroysku fyrisitingini, var ivasamt, hvar klagan um vantandi innlit kundi sendast. Umboðsmaðurin vísti á møguleikan at senda klaguna um vantandi innlit til leiðsluna í P/F Visit Faroe Islands. Umboðsmaðurin kunnaði síðani P/F Visit Faroe Islands um klaguna.

**Klagan skal vera umboðsmanninum í hendi í seinasta lagi eitt ár eftir, at tey viðurskifti, ið klagað verður um, áttu sær stað. Klagarin skal navngeva seg (Umboðsmanslógin § 6, stk. 2)**

## MÁL NR 23/08651

Ein borgari klagaði um barnaverndartænastuna fyri Eysturkommunu og Fuglafjarðar kommunu viðvíkjandi barnaverndarmáli sínum. Umboðsmaðurin avvísti klaguna grundað á, at viðurskiftini, klagað varð um, áttu sær stað meir enn eitt ár frammanundan klaguni.

## MÁL NR 23/17477

Ein borgari klagaði til umboðsmannin um kærunevndina í almannamálum, sum hevði staðfest eina avgerð hjá Almannaverkinum um sýtan av stuðul til keyp av bili. Avgerðin hjá Almannaverkinum var dagfest í 2021, og avgerðin frá kærunevndini í almannamálum var eisini dagfest í 2021 og send borgaranum fyrst í januar 2022. Sambært upplýsingunum í skjølunum var avgerðin hjá kærunevndini í almannamálum tikin meira enn eitt ár frammanundan klaguni til umboðsmannin. Umboðsmaðurin fekk tí ikki hjálpt við málinum og gjørdi ikki meira við tað, men kunnaði Føroya Kærustovn (fyrr. kærunevndin í almannamálum) um klaguna.

## MÁL NR 23/20268

Ein borgari klagaði um avgerð hjá Eiðis kommunu um afturtøku av byggiloyvi. Sambært skjølunum og upplýsingum frá klagara var avgerðin um afturtøku av byggiloyvi dagfest og send klagara meira enn 1 ár frammanundan, at klagan varð send til umboðsmannin. Av tí at klagan til umboðsmannin sostatt varð send meira enn eitt ár eftir, at avgerðin varð tikin og fráboðað, avvísti umboðsmaðurin hesa klagu.

**Hægsti myndugleiki á økinum skal hava tikið avgerð í málinum, áðrenn umboðsmaðurin kann viðgera eina klagu um eitt mál (Umboðsmanslógin § 6, stk. 3)**

## MÁL NR 22/23268

Ein borgari klagaði um Runavíkar kommunu í sambandi við viðgerðina av eini umsókn um byggiloyvi, har klagað varð um, hvørt umsóknin um byggiloyvið var viðgjørd í rættari nevnd í Runavíkar býráð, og um at umsóknin varð avgreidd uttan um vanligu mannagongdirnar í kommununi. Harumframt upplýsti klagarin, at kommunustýrislimirnir ongantíð fingu yvirlit yvir innkomin mál.
Umboðsmaðurin avvísti klaguna grundað á, at viðurskiftini í stóran mun snúðu seg um, hvørt Runavíkar kommuna helt ásetingarnar í kommunustýrislógini, og at klagari tí fyrst átti at troyta kærumøguleikan hjá Kommunala eftirlitinum.

## MÁL NR 23/05341

Ein borgari klagari til umboðsmannin um eina avgerð hjá Almannaverkinum um at nokta forsorgarhjálp í sambandi við vantandi barnaansing. Av skjølunum, sum klagarin sendi, sást, at samsvar var ikki millum yvirskriftina á skrivinum og innihaldið. Hóast yvirskriftin á skrivinum var “Avgerð um uppihaldsveiting”, var innihaldið av skrivinum eitt ætlanarskriv um avgerð.

Umboðsmaðurin helt tí, at endaliga avgerðin hjá Almannaverkinum var ikki tikin, og at klagarin tí hevði møguleika at venda sær til Almannaverkið við møguligum viðmerkingum til ætlanarskrivið. Umboðsmaðurin vísti á, at tá ið Almannaverkið hevði tikið avgerð, kundi klagarin, eins og víst á í ætlanarskrivinum, innan fýra vikur kæra avgerðina til Føroya Kærustovn.
Hetta merkti, at umboðsmaðurin ikki kundi viðgera eina klagu um avgerðina, fyrr enn Almannaverkið fyrst hevði tikið eina avgerð, og Føroya Kærustovnur hevði fingið høvið at taka støðu til málið.
Umboðsmaðurin avvísti tí klaguna, men kunnaði Almannaverkið um klaguna.

## MÁL NR 23/08030

Ein borgari klagaði um viðgerðina og avgerðina hjá Almannaverkinum í sambandi við eitt mál um stuðul til barn klagarans, ið ber brek.
Klagarin kunnaði umboðsmannin um, at klaga um somu viðurskifti varð send til Almanna- og mentamálaráðið og Barna- og Útbúgvingarmálaráðið.
Umboðsmaðurin avvísti klaguna grundað á, at viðkomandi hægri kærumyndugleiki ikki hevði tikið endaliga avgerð í málinum.

## MÁL NR 23/11279

Ein borgari vendi sær til umboðsmannin við eini klagu um, at Heilsutrygd hevði noktað honum innlit. Í frágreiðing til umboðsmannin greiddi Heilsutrygd frá, at stovnurin hevði ikki noktað viðkomandi innlit, men at Heilsutrygd hevði sent borgaranum eitt ávíst skjal, sum biðið varð um, og eisini hevði Heilsutrygd sent viðkomandi yvirlit yvir restina av skjølunum og biðið borgarin siga frá, hvørji av hesum skjølum, hann ynskti innlit í. Tá Heilsutrygd ikki hevði frætt aftur frá borgaranum, var ikki hent meira í málinum.

Umboðsmaðurin viðmerkti, at talan sostatt ikki var um nakra noktandi ella endaliga avgerð frá Heilsutrygd, og tískil var ikki grundarlag hjá umboðsmanninum at fara undir eina viðgerð av klagumálinum.

Umboðsmaðurin mælti borgaranum til at seta seg í samband við Heilsutrygd um, hvørji av skjølunum, hann vildi hava innlit í.

## MÁL NR 23/16308

Eitt foreldur klagaði til umboðsmannin um Sernám og Skúlan á Argjahamri í sambandi við skúlagongd hjá barni sínum. Barnið hevði fingið noktað skúlatilboð í nýggja serskúlatilboðnum á Argjahamri, og foreldrið vísti á, at lýsingin, sum Sernám hevði gjørt av barninum, als ikki var eftirfarandi og innihelt óneyvar upplýsingar.

Umboðsmaðurin valdi í fyrstu syftu at senda klaguna til Skúlan á Argjahamri og bað skúlan lata sær eina frágreiðing um málið.

Skúlin sendi umboðsmanninum frágreiðing um, at upptøka í serflokki hoyrir undir kunngerð um at skipa serligan skúla ella undirvísingartilboð, ið er ein kunngerð undir fólkaskúlalógini. Kunngerðin hevur ikki ásetingar um kæru, og er tað tí reglurnar í fólkaskúlalógini, ið avgera hetta. Sambært § 59, stk. 1 í fólkaskúlalógini, so kunnu avgerðir, sum skúlamyndugleikin á staðnum, herímillum eisini leiðari skúlans, hevur tikið, verða kærd til landsstýrismannin í seinasta lagi 4 vikur eftir, at avgerðin er fráboðað. Av tí at avgerðin upprunaliga varð fráboðað klagaranum uttan kærumøguleika, varð nú send nýggj avgerð til klagaran við kæruvegleiðing til Barna- og útbúgvingarmálaráðið.

Umboðsmaðurin kundi tí ikki viðgera eina klagu um avgerðina, fyrr enn hon var kærd til Barna- og útbúgvingarmálaráðið, og Barna- og útbúgvingarmálaráðið hevði tikið endaliga avgerð í málinum. Umboðsmaðurin avvísti tí hesa klaguna. Við tað at klagan um Sernám var knýtt at klaguni um Skúlan á Argjahamri, valdi umboðsmaðurin eisini at avvísa klaguna um Sernám.
Umboðsmaðurin kunnaði bæði Skúlan á Argjahamri og Sernám um klaguna.

## MÁL NR 23/16944

Ein borgari klagaði til umboðsmannin um, at Studni kravdi studning goldnan aftur fyri eitt tíðarskeið, har klagarin metti seg hava verið lestrarvirknan.

Avgerðin hjá Studna hevði kæruvegleiðing um, at avgerðin kundi kærast innan seks vikur til Føroya Kærustovn. Klagarin hevði ikki nýtt henda kærumøguleika, áðrenn klagað varð til umboðsmannin, og gingnar vóru meira enn seks vikur síðani avgerðin varð tikin. Umboðsmaðurin avvísti tí hesa klagu. Umboðsmaðurin vísti klagaranum á, at tað er Føroya Kærustovnur sum avger, um ein kæra kann loyvast, eftir at kærufreistin er farin.

## MÁL NR 23/19006

Ein borgari klagaði til umboðsmannin um skipanina við mánaðarkortum hjá Strandfaraskipum Landsins. Borgarin vísti á, at Strandfaraskip Landsins lat mánaðarkortið fyri Teistan telja niður frá tí degi, tá fyrsta bílegging varð gjørd, sjálvt um bíleggingin varð avlýst, og sostatt eingin túrur gjørdur.

Umboðsmaðurin sendi klaguna til Strandfaraskip Landsins og bað um eina frágreiðing. Strandfaraskip Landsins greiddi í telduposti til umboðsmannin frá, at klagarin ikki hevði sent formliga klagu til Strandfaraskip Landsins, og at Strandfaraskip Landsins tí ikki hevði viðgjørt málið sum eitt klagumál.

Hetta førdi við sær, at umboðsmaðurin ikki kundi viðgera eina klagu um hesi viðurskifti, fyrr enn Strandfaraskip Landsins hevði viðgjørt málið, og møguligur kærumøguleiki varð troyttur. Eftir avtalu við klagaran heitti umboðsmaðurin síðani á Strandfaraskip Landsins um at viðgera klagu borgarans. Umboðsmaðurin vísti eisini Strandfaraskip Landsins á, at tað krevur ítøkiliga lógarheimild, um Strandfaraskip Landsins skal kunna krevja, at borgarar nýta ávíst oyðublað ella ávísa skipan fyri at klaga.

## Grundarlag er ikki fyri at gera meira við klaguna (Umboðsmanslógin § 6, stk. 4)

### MÁL NR 22/23000

Ein borgari klagaði um, at Sunda kommuna í sambandi við gjald fyri bátapláss kravdi, at klagarin skuldi gera eina sjálvvirkandi gjaldsavtalu gjøgnum ávísan veitara, og at gjaldast ikki kundi við reiðum peningi. Umboðsmaðurin bað Sunda kommunu greiða sær frá málinum og senda sær skjølini í málinum.

Viðvíkjandi kravinum um at nýta ávísan veitara til gjaldsavtalu greiddi Sunda kommuna umboðsmanninum frá, at tað ikki var ein treyt, at sjálvvirkandi gjaldsskipanin skuldi stovnast gjøgnum ávísa veitaran. Sunda Kommuna upplýsti, at ein fakturi, sum klagarin sjálvur kundi melda til gjaldsavtalu fór at verða sendur klagaranum.
Viðvíkjandi møguleikanum at rinda fyri bátapláss við reiðum peningi, upplýsti Sunda kommuna, at gjaldsterminalur var á kommunuskrivstovuni. Gjaldsterminalurin varð fyri tað mesta brúktur til at fylla á EL-kort, ið bátaeigarar nýta í bátahyljunum, og ætlanin var, at gjaldið fyri bátapláss skuldi verða sjálvvirkandi.

Sambært grein § 81 í gjaldslógini, Anordning nr. 1223 af 4. juni 2021 om ikrafttræden for Færøerne af lov om betalinger, skal ein gjaldsmóttakari taka ímóti reiðum peningi, um tikið verður ímóti gjaldskorti. Brúkaraumboðið hevur eftirlit við, at hendan reglan – kontantreglan – í gjaldslógini verður hildin.

Við hesum í huga helt umboðsmaðurin, at Brúkaraumboðið átti at fáa høvi at taka støðu til spurningin um møguleikan at rinda við reiðum peningi fyri bátaplássið hjá Sunda kommunu, áðrenn ein møgulig viðgerð av klaguni fór fram hjá umboðsmanninum.
Umboðsmaðurin helt tí ikki grundarlag vera fyri at gera meira við málið, men sendi eftir avtalu við klagaran spurningin um rættin at rinda við reiðum peningi til Brúkaraumboðið.

## MÁL NR 23/00409

Umboð vegna ein borgara sendi umboðsmanninum klagu um, at borgarin ikki fekk nakra avgerð frá Almannaverkinum til umsókn sína um leingjan av dagpengum.
Almannaverkið sendi umboðsmanninum frágreiðing um málið. Av frágreiðingini og skjølunum sást, at Almannaverkið í fyrstu atløgu metti, at borgarin ikki leyk treytirnar fyri at fáa dagpening longri tíðarskeið enn 52 vikur. Almannaverkið hevði undir klagumálsviðgerðini mett um málið av nýggjum og hevði nú, grundað á tilmælið frá læknafakliga ráðgevanum, avgjørt at leingja dagpeningatíðarskeiðið og játtað leingjan av dagpeningi til ávíst dato. Almannaverkið upplýsti, at málið hevði verið uppi at venda nakrar ferðir og ásannaði, at avgreiðslutíðin hevði verið ov drúgv.
Umboðsmaðurin viðmerkti, at hóast málsviðgerðartíðin kundi tykjast at hava verið í so long, so hevði støðugt verið gongd í málinum. Nú Almannaverkið hevði avgreitt málið, og klagarin hevði fingið játtandi svar uppá sína umsókn, metti umboðsmaðurin, at grundarlag var ikki fyri at gera meira við klaguna.

## MÁL NR 23/18379

Ein borgari klagaði um, at tað ikki vóru virkandi gøtuljós í helvtini av Hattarvík. Borgarin hevði, sambært klaguni, vent sær til kommununa við trupulleikanum fleiri ferðir, uttan at trupulleikin varð loystur. Umboðsmaðurin sendi klaguna til Fugloyar kommunu og bað um eina frágreiðing.
Fugloyar kommuna greiddi frá, at kommunan hevði eina avtalu við ein arbeiðstakara viðvíkjandi viðlíkahaldi av millum annað gøtuljósum. Í samráð við arbeiðstakaran varð avrátt, at ein betri og meiri umfatandi loysn mátti finnast á trupulleikanum. Kommunan hevði tí í samráð við arbeiðstakaran avgjørt at leggja nýggjar kaðlar til gøtuljós, soleiðis at talan kundi verða um eina varandi og tryggari loysn. Arbeiðið var sett í gongd og neyðugt tilfar var bílagt, eins og kommunan í samráð við arbeiðstakaran hevði gjørt avtalu um grevstur í sambandi við nýggja kaðalveiting.

Kommunan segði seg hava kunnað borgaran um, at gongd var í málinum, og at kommunan arbeiddi við at loysa málið. Henda kunning hevði tó verið munnlig.
Av tí at gongd var í málinum, og at klagarin í øllum førum nú varð kunnaður um gongdina í málinum, helt umboðsmaðurin ikki grundarlag vera fyri at gera meira við málið.

## MÁL NR 23/18640

Eitt foreldur klagaði um, at Suðuroyar barnaverndartænasta ikki gjørdi nakað við stúranarfráboðanir klagarans viðvíkjandi einum barni. Eisini varð klagað um vantandi svar til umbøn um innlit í egin viðurskifti.
Umboðsmaðurin bað barnaverndartænastuna um eina frágreiðing og skjølini í málinum.

Barnaverndartænastan upplýsti, at tey taka fráboðanirnar í størsta álvara og taka neyðug stig í tí sambandi. Frágreiðingin og skjølini frá barnaverndini stuðlaðu, eftir umboðsmansins meting, ikki undir klaguna um, at barnaverndartænastan ikki gjørdi nakað við stúranarfráboðanirnar.
Barnaverndartænastan upplýsti eisini, at vantandi innlitið var av misgáum, og at innlitsumbønin nú var svarað. Barnaverndartænastan fór at fyribyrgja at hetta hendi aftur.
Við støði í hesum helt umboðsmaðurin ikki grundarlag vera fyri at gera meira við málið.

## MÁL NR 23/18970

Eitt foreldur at umsorganaryvirtiknum barni klagaði um eina avgerð frá Føroya Kærustovni um at burturvísa kæru klagarans. Klagarin hevði kært til Føroya Kærustovn um, at barn klagarans varð koppsett, uttan at foreldrið varð kunnað og hevði givið samtykki til tað.
Í kæruavgerðini sást, at Føroya Kærustovnur hevði burturvíst kæruna, tí talan var um kæru um eina prosessuella avgerð, sum ikki var at meta sum ein fyrisitingarlig avgerð, og at ásett var ikki í løgtingslóg ella við heimild í løgtingslóg, at slíkar avgerðir kundu kærast til Føroya Kærustovn. Av hesi orsøk var kæran ikki fevnd av málsræðinum hjá Føroya Kærustovni, og hevði Føroya Kærustovnur ikki heimild at viðgera kæruna.
Umboðsmaðurin var samdur við Føroya Kærustovni í, at kærustovnurin ikki hevði málsræði, og helt tí ikki grundarlag vera fyri at viðgera klaguna um avvísingina hjá Føroya Kærustovni.
Umboðsmaðurin helt, at koppseting mátti metast sum heilsufakligt virksemi, og vísti á, at kærur um heilsufakligt virksemi, eitt nú ónøktandi ráðgeving og vegleiðing, kunnu latast Styrelsen for Patientklager.



# 7 Onnur viðgerð og hjálp til borgarar

Umboðsmaðurin hevur ikki skyldu til at taka allar klagur upp til viðgerðar. Ein klaga verður altíð kannað gjølla, áðrenn avgerð verður tikin, um hon skal avvísast. Í tílíkum metingum verður vanliga hugt at, um tað eru útlit fyri, at umboðsmaðurin kann hjálpa viðkomandi.

Ein avvísing av einari klagu kann vera úrslitið av einari víðfevndari málsviðgerð hjá umboðsmanninum.

**Niðanfyri eru dømir um mál, har grundarlag ikki var fyri at gera meira við klaguna, tí gongd var komin á málið, málið var loyst undir klaguviðgerðini ella borgarin fekk hjálp á annan hátt.**

## MÁL NR 23/02885

Ein borgari klagaði til umboðsmannin um, at TAKS ikki svaraði eini umbøn um innlit. Klagarin hevði síðst í november 2022 biðið um innlit í øll skjøl, ið TAKS hevði viðvíkjandi klagaranum frá 2010 og frameftir. Klagarin hevði einans fingið eina móttøkuváttan og sendi tí síðst í januar 2023 eina klagu til umboðsmannin. Umboðsmaðurin gjørdi av at senda klaguna til TAKS og bað TAKS lata umboðsmanninum eina frágreiðing um málið. Fyrst í februar 2023 svaraði TAKS klagaranum og avgreiddi innlitsumbønina við at senda tey skjøl, sum funnin vórðu. Talan var um eina umfatandi umbøn, har TAKS hevði gjøgnumgingið allar journalir fyri at prenta neyðugu skjølini út. Við tað at klagarin nú hevði fingið svar, gjørdi umboðsmaðurin ikki meir við málið. Umboðsmaðurin minti tó TAKS á, at ein umbøn um innlit skal svarast skjótast gjørligt, og um myndugleikin ikki hevur gingið umbønini á møti ella noktað henni innan 10 dagar, skal myndugleikin boða viðkomandi frá orsøkini til hetta, og nær ein avgerð kann væntast.

## MÁL NR 23/07334

Tann 17. mars 2023 klagaði ein borgari um vantandi svar frá Búnaðarstovuni til eina innlitsumbøn, har klagarin um miðjan februar 2023 søkti um innlit í, hvør hevði søkt og fingið verkætlanarstuðul.
Tann 22. mars 2023 sendi umboðsmaðurin klaguna til Búnaðarstovuna og bað um eina frágreiðing um málið.
Við telduposti tann 17. apríl 2023 svaraði Búnaðarstovan umboðsmanninum, at innlitsumbønin av misgáum ikki varð skrásett fyrrenn hin 17. mars 2023, men at umbønin var svarað. Við tað at innlitsumbønin var svarað, gjørdi umboðsmaðurin ikki meira við málið.

## MÁL NR 23/13415

Ein borgari klagaði um miðjan juni 2023 til umboðsmannin um drúgva málsviðgerðartíð og vantandi kunning um, nær avgerð kundi væntast frá Fíggjarmálaráðnum viðvíkjandi klagu um, at Tinglýsingin hevði burturvíst eitt ognarbræv, tí marknaðarvirðið ikki var ásett. Umboðsmaðurin sendi klaguna til Fíggjarmálaráðið og bað um eina frágreiðing um viðgerðina av málinum.

Um miðjan juli 2023 fekk klagarin ætlanarskriv um avgerð frá Fíggjarmálaráðnum.

Umboðsmaðurin viðmerkti viðvíkjandi viðgerðartíðini, at tað, sambært Fíggjarmálaráðnum, vóru fleiri prinsipiell viðurskifti í málinum. Kærumál um tinglýsingaravgjald høvdu ikki verið kærd til ráðið áður, og neyðugt varð tí at taka støðu til, hvørt Fíggjarmálaráðið var rætti kærumyndugleiki, hvørjir lutir skuldu roynast, og hvussu langt kæruviðgerðin skuldi fara inn í metingina hjá Tinglýsingini. Eisini vórðu tvær aðrar kærur um líknandi avgerðir hjá Tinglýsingini viðgjørdar samstundis. Telefonsamskiftið um gongdina í málinum hevði javnan verið millum klagaran og Fíggjarmálaráðið, eins og skrivlig kunning eisini var send klagaranum. Hóast klagarin av misgáum ikki hevði fingið kunning um støðuna í málinum í juni 2023, áðrenn klagan varð send umboðsmanninum, helt umboðsmaðurin ikki, at grundarlag var fyri at gera meira við málið viðvíkjandi málsviðgerðartíðini.

## MÁL NR 23/16502

Ein borgari sendi umboðsmanninum klagu um framferðina hjá Almannaverkinum í sambandi við eina umsókn um forsorgarhjálp. Borgarin vísti á, at hann hevði søkt um almannaveiting, men ikki fingið eina skrivliga avgerð frá Almannaverkinum og tískil ikki fingið útgjald í nærum fimm mánaðir.
Umboðsmaðurin bað Almannaverkið um at geva sær eina frágreiðing um málið. Almannaverkið ásannaði í frágreiðing sínari, at talan var um, at Almannaverkið ikki hevði sett seg inn í viðurskiftini hjá klagaranum og givið honum nøktandi vegleiðing í mun til umsókn hansara um almannaveiting.
Almannaverkið boðaði samstundis umboðsmanninum frá, at klagarin fór at fáa játtað ta veiting, ið honum vantaði.
Eftir hetta boðaði umboðsmaðurin klagarunum frá, at hann ikki helt grundarlag vera fyri at gera meira við klagu hansara.

## MÁL NR 23/18134

Ein advokatur klagaði fyrst í september 2023 vegna ein borgara og eitt fakfelag um ov langa viðgerðartíð hjá Umhvørvismálaráðnum av kæru um noktan av uppafturtøku av máli um farloyvi. Umboðsmaðurin valdi í fyrstu syftu ikki at biðja um frágreiðing, men spurdi heldur Umhvørvismálaráðið um málsnummar og um nakað kundi upplýsast um, nær avgerð ætlandi fór at verða tikin. Um miðjan september 2023 svaraði Umhvørvismálaráðið

umboðsmanninum, at avgerðin nú var tikin og send pørtunum. Umhvørvismálaráðið hevði givið kærara viðhald í kæruni um, at Umhvørvisstovan skuldi taka umbønina um farloyvi upp til nýggja viðgerð. Við tað at klagarin nú hevði fingið eina avgerð, gjørdi umboðsmaðurin ikki meira við málið.

**Frágreiðing frá myndugleikanum um málið gjørdi, at umboðsmaðurin metti, at grundarlag var ikki fyri at gera meira við málið.**

## MÁL NR 22/20434

Ein borgari klagaði um handfaringina hjá Almannaverkinum av einum máli um umsorganaryvirtikið barn, har ætlaða fosturfamiljan at barni klagarans ikki fekk játtað tað, sum var neyðugt fyri at taka barnið til fosturs, sum til dømis avlamisbil og samsýning.
Umboðsmaðurin vendi sær til Almannaverkið um málið, sum upplýsti, at stuðul kann veitast til barn, sum fer til fosturfamilju at búgva, og at dagtilboð til barnið varð játtað og kundi setast í verk, tá tað var aktuelt. Somuleiðis metti Almannaverkið, at barnið leyk krøvini fyri avlamisbili, sum sannlíkt fór at verða játtaður, tá søkt varð. Harumframt upplýsti Almannaverkið, at tað sannlíkt ikki fór at verða nakar trupulleiki at játta barninum umlætting, men at játtanin kravdi umsókn frá fosturfamiljuni.
Grundað á frágreiðingina frá Almannaverkinum, og at gongd enn var í málinum, metti umboðsmaðurin, at grundarlag var ikki fyri at gera meira við klaguna.

## MÁL NR 23/08715

Ein borgari klagaði um, at barnaverndartænastan í Vágum hevði avmarkað samveru klagarans við børn síni, og at klagarin onki skrivligt hevði fingið frá barnaverndartænastuni um hetta.
Umboðsmaðurin vendi sær til barnaverndartænastuna í Vágum, sum upplýsti, at barnaverndartænastan ikki ger skrivligar samveruætlanir, tí fyrisitingarligar avgerðir um samveru verða tiknar av Familjufyrisitingini, men kann tó stuðla undir at hjálpa foreldrum at gera eina samveruætlan, soleiðis at heimliga reglusemið hjá børnum verður lættari at halda.
Grundað á frágreiðingina frá barnaverndartænastuni í Vágum, metti umboðsmaðurin, at grundarlag var ikki fyri at gera meira við klaguna.

## MÁL NR 23/22746

Ein borgari klagaði um, at hann ikki varð hoyrdur í sambandi við, at Tórshavnar kommuna eftir hansara tykki legði eina gongugøtu ov tætt við bústað klagarans.
Umboðsmaðurin vendi sær til Tórshavnar kommunu, sum upplýsti, at kommunan hevði verið á ástaðarfundi við klagara og hevði vent sær til eigarafelagið.
Grundað á frágreiðingina frá Tórshavnar kommunu, metti umboðsmaðurin, at grundarlag var ikki fyri at gera meira við klaguna.



*„At hava eina heimasíðu er ikki nóg mikið, um røkkast skal út til børn og ung í Føroyum“*



**Hanna Vang**, umboðsmaður

# Kunningarvirksemið hjá barnanna umboðsmanni í 2023

Í 2014 fekk Løgtingsins umboðsmaður víðkaðar heimildir á barna- og ungdómsøkinum. Samleikin ”Barnanna umboðsmaður” var skaptur fyri at varpa ljós á og gera sjónligt arbeiðið hjá umboðsmanninum á barnaøkinum.

Í almennu viðmerkingunum til lógarbroytingina í 2014 varð dentur lagdur á, at grundleggjandi eyðkennini við umboðsmansstovninum sum óheftur eftirlitsstovnur, vórðu varðveitt. Uppgávurnar á barna- og ungdómsøkinum skuldu í stóran mun røkjast innan karmarnar av galdandi umboðsmanslóg, soleiðis at umboðsmaðurin framhaldandi skuldi gera vart við síni sjónarmið umvegis niðurstøður og frágreiðingar eftir at hava viðgjørt ítøkiligar klagur ella hava verið á eini eftirlitsvitjan.

Ein nýggj uppgáva var tó nevnd í almennu viðmerkingunum. Hildið var neyðugt at gera nakað burturúr at kunna almenningin og serliga børn og ung um møguleikarnir at klaga til umboðsmannin og um, hvat umboðsmaðurin kann gera fyri at hjálpa klagarum.

Umboðsmaðurin hevur tí eina heimasíðu við kunning um Barnarættindasáttmálan og um, hvussu børn kunnu klaga til umboðsmannin. Síðan eitur www.bum.fo. Møguleiki er at senda klagur inn umvegis hesa síðuna.

## Kunning til skúlanæmingar um ST-barnarættindasáttmálan

Tað er ein sannroynd, at tað ikki er nóg mikið einans at hava eina heimasíðu sum www.bum.fo, um røkkast skal út til børn og ung í Føroyum. Eg havi tí til dømis boðið meg at vitja fólkaskúlar í Føroyum fyri at greiða børnum frá Barnarættindasáttmálanum og klagumøguleikanum til umboðsmannin.

Sum liður í kunningarvirksemi mínum luttók eg eisini á barnarættindadøgum fyri 7. flokkar, sum vóru hildnir í Norðurlandahúsinum 22.-23. februar 2023. Í hesi framløgu vísti eg á ST-barnarættindasáttmálan og legði serligan dent á grein 12 og rættin hjá børnum at vera hoyrd.

Tann 5. oktober varð eg boðin at vitja Viðareiðis skúla og hava framløgu fyri næmingunum um ST-barnarættindasáttmálan og klagumøguleikan til umboðsmannin. Vitjanin var komin í lag í sambandi við ætlanina at skipa næmingaráð á skúlanum.

Tann 20. november, altjóða barnarættindadagin, varð eg boðin til stórfingið tiltak, har næmingaráðið í Fuglafjarðar skúla hevði tikið stig til at savna øll næmingaráðini á skúlum í Føroyum til at halda dagin saman. Fleiri enn 500 næmingar vóru savnaðir, og 20 skúlar vóru umboðaðir til tiltakið. Eg slapp at greiða næmingunum frá ST-barnarættindasáttmálanum, um rættindi hjá børnum og møguleikan at venda sær til Barnanna umboðsmann.

## Almenn kunning um virksemið á barnaøkinum

Tann 21. mars 2023 varð eg boðin við til altjóða Down syndrom dagin, sum varð hildin í skúlanum við Ósánna. Evnið fyri dagin var "mín rødd" og ljós varð varpað á røddina hjá borgarum við Down syndrom, rætt teirra til eitt vælvirkandi føroyskt mál, og rætt teirra at verða hoyrd. Eg fekk, sum barnanna umboðsmaður høvi at luttaka í sofapráti og svara spurningum og kunna um møguleikan at senda mær klagu.

Í framhaldi av kanning míni av næmingaráðum í fólkaskúlum, frískúlum og serskúla (LUM 21/19719), varð eg tann 13. september boðin at hava framløgu á árliga skúlaleiðaradegnum fyri allar leiðslur í føroysku fólkaskúlunum, sum Undirvísingarstýrið skipar fyri. Eg fekk høvi eitt nú at greiða frá lógargrundarlagnum undir kanningini og teimum viðkomandi greinunum í ST-barnarættindasáttmálanum.

Í november 2023 varð árliga blaðið hjá MEGD givið út, hesaferð við evninum "Børn og ung hava javnbjóðis rætt til eitt virðiligt lív". Eg fekk møguleikan at skriva eina grein um virksemið á barnaøkinum við serligum atliti at brekøkinum. Greinin er at finna í MEGD-blaðnum, men er eisini at finna í savninum á heimasíðu míni.

## Ætlanir

Ætlan mín er at halda áfram við at bjóða kunning til børn og ung um barnarættinda-sáttmálan, um møguleikan at klaga og um, hvat umboðsmaðurin kann gera fyri at hjálpa. Eg bjóði í hesum sambandi kunning til skúlar og vóni at fáa høvi at vitja fleiri skúlar og stovnar, har børn eru.

*„Ein fyrisitingarlig avgerð er endaliga niðurstøða myndugleikans í einum ítøkiligum fyrisitingarmáli, ið ásetir, hvør rættarstøðan skal vera í ítøkiliga førinum, og er sostatt endastigið í málsviðgerðini“*



**Mary K. Cazabon**, fulltrúi

# Avgerðarhugtakið í fyrisitingarlógini

Avgerðir verða dagliga tiknar í samfelagnum av almennum myndugleikum. Verður eitt starvsfólk sagt úr starvi á almennum stovni ella fær sýtt eina umbøn um farloyvi, er talan um eina fyrisitingarliga avgerð. Søkir ein borgari eitt nú um eina almannaveiting ella um byggiloyvi, er svarið til umsóknina somuleiðis ein fyrisitingarlig avgerð.

Tá talan er um mál, har ein avgerð eftir fyrisitingarlógini er ella fer at verða tikin, gevur avgerðin partsrættindini, sambært kapitlum 4-7 í fyrisitingarlógini. Støðan er ein onnur, tá talan er um ávegisniðurstøður og útinnandi fyrisiting.

Hendan greinin hevur til endamáls at lýsa avgerðarhugtakið í fyrisitingarlógini, munin á fyrisitingarligum avgerðum, fyrisitingarligum ávegisniðurstøðum og útinnandi fyrisiting (faktiskt forvaltning), umframt undantøk til avgerðarhugtakið.

## Lógargrundarlagið

Sambært § 2, stk. 1 í fyrisitingarlógini, (løgtingslóg nr. 132 frá 10. juni 1993 um fyrisitingarlóg), er lógin galdandi, har talan er um viðgerð av málum, har ein fyrisitingarmyndugleiki hevur ella fer at taka avgerð.

Sambært § 2, stk. 4 í fyrisitingarlógini, kann landsstýrið áseta reglur um, at lógin skal vera galdandi fyri annað fyrisitingarvirksemi. Slíkar reglur hevur landsstýrið ikki ásett.

Fyrisitingarlógin, ið er sett í gildi í Føroyum og enn er galdandi, er gjørd við fyrimynd í donsku forvaltningsloven frá 1985 (lov nr. 571 af 19. december 1985). Tí verður víst til viðmerkingarnar í lógaruppskotinum frá 1985 til donsku forvaltningsloven (1985/1 LSF 4).

Fyrisitingarlógin hevur onga allýsing av avgerðarhugtakinum, men viðmerkingarnar til lógaruppskotið geva tó leiðbeining um, hvussu hugtakið skal skiljast.

## Fyrisitingarligar avgerðir

Sambært løgfrøðiligum lesnaði, eyðkenna hesar treytir eina fyrisitingarliga avgerð:

– Ein niðurstøða frá einum almennum myndugleika,
– ið verður tikin á almenrættarligum grundarlagi,
– har myndugleikin sjálvur ásetir, hvat rættarstøðan skal vera í ítøkiliga førinum, og
– ið vendir sær til ein uttanhýsismóttara.

Niðan fyri verða hesar fýra treytirnar nærri lýstar hvør sær:

*Almennur myndugleiki*
Ein avgerð eftir fyrisitingarlógini er ein niðurstøða, ið er tikin av einum almennum myndugleika undir heimastýrinum, t. e. landsins myndugleikar, kommunalir myndugleikar og interkommunalir felagsskapir.

Harumframt kann landsstýrið áseta, at lógin heilt ella partvíst skal vera galdandi fyri feløg, stovnar og felagsskapir, ið ikki eru partar av almennu fyrisitingini, men har útreiðslur av virksemi teirra í høvuðsheitum verða rindaðar av landi ella kommunu, ella har tey við heimild í lóg kunnu taka avgerðir vegna land ella kommunu. Talan er sostatt um myndugleikar, ið hava útinnandi vald.

Uttan fyri fyrisitingarlógina fella ríkismyndugleikar, t. e. løgreglan og dómstólar, eins og Løgtingið og stovnar undir Løgtinginum, t. e., umframt Løgtingsins umboðsmann, Landsgrannskoðanin.

Í LUM 21/05687 avvísti umboðsmaðurin eina klagu frá einum borgara við teirri grundgeving, at umboðsmaðurin ikki kann viðgera klagur, ið snúgva seg um privatrættarligar ósemjur millum ein borgara og eitt íbúðarlutafelag, ið ikki er ein almennur myndugleiki.

*Almenrættarligt grundarlag*
Avgerðir eftir fyrisitingarlógini skulu verða tiknar á almenrættarligum grundarlagi, sum merkir, at talan vanliga ikki skal vera um eina privatrættarliga avtalu. Almennir myndugleikar kunnu tó, eins og privatpersónar, gera privatrættarligar avtalur, sum eitt nú gera eina avtalu við eina handverkarafyritøku um at gera umvælingar av almenna bygninginum, har myndugleikin búleikast.

Í LUM 21/25830 klagaði eitt áhugafelag um eina avtalu um nýtslu av høli, undir hesum treytirnar fyri at afturrinda útreiðslur. Hetta mátti metast sum privatrættarligt virksemi, og avvísti umboðsmaðurin tí klaguna.

*Myndugleikin ásetir sjálvur, hvør rættarstøðan skal vera í ítøkiliga førinum*
Myndugleikin skal sjálvur áseta, hvør rættarstøðan skal vera, tá talan er um fyrisitingarligar avgerðir. Hetta merkir, at myndugleikin sjálvur út frá galdandi reglum tekur støðu til, hvat skal vera galdandi í ávísum føri.

Avgerðarhugtakið hevur tí við sær, at talan vanliga ikki kann vera um eina avtalu millum myndugleikan og borgaran ella annan part.

*Uttanhýsismóttakari*
Tá myndugleikin hevur tikið støðu til, hvør rættarstøðan skal vera í fyrisitingarmálinum, skal móttakarin kunnast um avgerðina. Tað, at móttakarin skal vera ein uttanhýsismóttakari, merkir, at avgerðin ikki kann verða stílað myndugleikanum sjálvum, sum eitt nú rundskriv verða.

Móttakarin er vanliga borgarin, sum er partur í málinum. Er talan um eina kærumálsavgerð, kann móttakarin tó eisini vera myndugleikin, ið tók upprunaavgerðina.

*Samanumtikið*
Lógir, kunngerðir, rundskriv og aðrar almennar reglur eru av røttum eisini fevnd av fyrisitingarlógini og avgerðarhugtakinum og áseta, eins og fyrisitingarligar avgerðir, hvør rættarstøðan skal vera. Munurin er tó tann, at meðan ein fyrisitingarlig avgerð hevur rættarvirknað fyri ávísan ella ávísar móttakarar, hava almennar reglur rættarvirknað fyri øll. Sostatt er ongin partur í málinum, og harvið eru reglurnar í kapitlunum 4-7 í fyrisitingarlógini ikki viðkomandi. Tí verða almennar reglur ikki lýstar nærri í hesi grein.

Kári á Rógvi og Bárður Larsen lýsa fyrisitingarliga avgerðarhugtakið í bókini Fyrisitingarlóg, 2. útgáva, 2012, s. 78 soleiðis: “niðurstøða ið ítøkiliga ásetir rættarstøðuna hjá parti í fyrisitingarmáli.”

Ein fyrisitingarlig avgerð er endaliga niðurstøða myndugleikans í einum ítøkiligum fyrisitingarmáli, ið ásetir, hvør rættarstøðan skal vera í ítøkiliga førinum, og er sostatt endastigið í málsviðgerðini.

Ein fyrisitingarlig avgerð er bindandi og kann vera munnlig eins og skrivlig.

## Fyrisitingarligar ávegisniðurstøður

Ávegisniðurstøður verða á donskum nevndar bæði processuelle- og procesledende beslutninger.

Har ein fyrisitingarlig avgerð er ein endalig avgerð í einum fyrisitingarmáli, ið ásetir, hvør rættarstøðan skal vera, er ein ávegisniðurstøða ein støðutakan til partar av fyrisitingarliga avgerðarmálinum, meðan málið enn er í viðgerð hjá myndugleikanum, og innan endalig avgerð verður tikin í fyrisitingarliga avgerðarmálinum.

Ávegisniðurstøður eru eitt nú støðutakan til, hvørt eitt mál skal takast upp, hvørt onkur skal hoyrast í einum máli, og hvørt eitt mál skal sendast øðrum myndugleika til metingar, sí Fyrisitingarlóg, s. 78, har ávegisniðurstøður verða nevndar "niðurstøða um mannagongd" og "tilmæli".

Sambært serstøku viðmerkingunum til § 2 í lógaruppskotinum, er talan ikki um eina avgerð, tá ein myndugleiki tekur støðu til, hvørt eitt mál skal viðgerast ella ikki, men eina ávegisniðurstøðu.

Dømi um ávegisniðurstøður eru støðutakan til partsumboðan, hvørt upplýsingar skulu innheintast, ella kanningar og metingar skulu gerast í einum máli, og støðutakan til, hvørt eitt mál skal niðurleggjast, meðan annað mál er í viðgerð, ella hvørt eitt mál, sambært § 7, stk. 2 í fyrisitingarlógini, skal sendast øðrum myndugleika til avgerðar. Vanliga ber ikki til at klaga um at vera partshoyrdur í einum máli, meðan málið enn er undir viðgerð, men hetta kann kærast til viðkomandi kærumyndugleika, tá avgerð er tikin í málinum, sí Karsten Revsbech, v. fl., Forvaltningsret – sagsbehandling, 8. útgáva, 2019, s. 26-27 og Hans Gammeltoft Hansen, Forvaltningsret, 2. útgáva, 2002, s. 50-51.

Í LUM 22/05930 snúði klagan seg millum annað um, at klagari metti, at ein foreldraførleikakanning í sambandi við eitt barnaverndarmál var ein fyrisitingarlig avgerð. Klagarin vísti á, at metingar og niðurstøður í kanningini fóru at hava við sær, at ávís tiltøk fóru at verða sett í verk mótvegis klagara. Føroya Kærustovnur avvísti málið við teirri grundgeving, at talan var um útinnandi fyrisiting. Umboðsmaðurin var samdur við Føroya Kærustovni í, at virksemi hjá sálarfrøðingi í sambandi við foreldraførleikakanning var útinnandi fyrisiting. Her kann leggjast afturat, at sjálv støðutakanin til, hvørt ein foreldraførleikakanning skal setast í verk í einum fyrisitingarligum avgerðarmáli ella ikki, áðrenn avgerð verður tikin í málinum, má helst metast sum ein ávegisniðurstøða.

Í LUM 20/00021 klagaði ein borgari um tvinnar avgerðir hjá Kærunevndini í lendismálum í sambandi við eitt byggimál hjá grannanum, har tað var planerað ov høgt. Umboðsmaðurin viðgjørdi fyrru avgerðina, har millum annað spurningurin um partshoyring varð viðgjørdur. Umboðsmaðurin helt, at tá ein kommuna viðger umsókn frá borgara um byggiloyvi, eigur kommunan, áðrenn hon tekur støður til umsóknina, at kanna og taka støðu til, um nakar granni skal partshoyrast, sambært § 18 í fyrisitingarlógini, og um grannahoyring skal fremjast. Støðutakan til partsstøðu má metast sum dømi um eina ávegisniðurstøðu í byggimálinum.

Sambært § 2, stk. 1 í fyrisitingarlógini, er fyrisitingarlógin ikki galdandi fyri ávegisniðurstøður, uttan so er, at landsstýrið hevur avgjørt annað, sambært § 2, stk. 4 í fyrisitingarlógini. Ávegisniðurstøður geva sostatt vanliga ikki partsrættindi eftir kapitlunum 4-7 í fyrisitingarlógini. Eitt nú hevur ein partur í einum máli rætt til grundgeving og kæruvegleiðing, tá ein avgerð er tikin, har hann ikki fær fult viðhald. Hesi rættindi hevur hann ikki, tá ein myndugleiki eitt nú tekur støðu til, hvørt eitt mál skal sendast í hoyring ella ikki.

## Útinnandi fyrisiting

Útinnandi fyrisiting verður á donskum nevnd faktisk forvaltning.

Har ein avgerð er endaliga støðutakanin til sjálvt fyrisitingarmálið, og sum ásetir rættarstøðuna hjá borgaranum, er útinnandi fyrisiting støðutakan til ymisk viðurskifti innan almennu fyrisitingina, har talan tó ikki er um eitt fyrisitingarligt avgerðarmál. Meðan ein avgerð hevur rættarvirknað, hevur útinnandi fyrisiting útinnandi virknað, sí Forvaltningsret, s. 35.

Útinnandi fyrisiting er fyrisitingarmálið almenn framleiðsla av vørum og tænastum, undir hesum undirvísing, eldrarøkt, vegagerð og daglig skipan av almennum arbeiðsplássum, sí Fyrisitingarlóg, s. 78, har útinnandi fyrisiting verður nevnd "faktisk fyrisiting".

Sambært serstøku viðmerkingunum til § 2 í lógaruppskotinum, er sjúklinga- og onnur viðskiftafólkaviðgerð, eins og frálæra og ráðgeving, útinnandi fyrisiting.

Onnur dømi um útinnandi fyrisiting eru rakstur av barnaansingarplássum og ellis- og røktarheimum. Eitt nú er støðutakan til, hvussu ein skúlaflokkur skal skipast, útinnandi fyrisiting. Støðutakanin til, hvørja viðgerð ein sjúklingur skal hava, er eisini útinnandi fyrisiting.

Í LUM 20/00128 klagaði ein borgari undir korona-tíðini til Løgtingsins umboðsmann um vantandi heimild hjá Tórshavnar kommunu at seta krav um, at borgarar, ið koyrdu við bussinum, skuldu bera munnbind. Umboðsmaðurin helt, at kravið um at bera munnbind í bussunum var at meta sum útinnandi fyrisiting, og at Tórshavnar kommuna uttan beinleiðis lógarfesta heimild kundi seta treytir um, at øll ferðandi í bussunum skulu bera munnbind, meðan tey vóru í bussunum.

Í LUM 22/12242 klagaði eitt foreldur um, at barnaverndartænastan ikki vildi útflýggja passini hjá ávísum børnum klagarans, ið vóru umsorganaryvirtikin. Umboðsmaðurin metti, at niðurstøðan hjá barnaverndartænastuni um, at passini skuldu vera í varðveitslu, har børnini búðu, var útinnandi fyrisiting, og gjørdi tí ikki meira við klaguna.

Í LUM 22/16132 klagaði eitt foreldur um, at ein kommuna gjørdi mismun á børnum í kommununi, tí barn klagarans var einasta barn á einum dagstovni í kommununi, ið varð sýtt ansing tveir ávísar dagar. Umboðsmaðurin kundi ikki taka støðu til ítøkiligu metingina og raðfestingina hjá dagstovnaleiðaranum av, hvussu starvsfólkaorkan og arbeiðið best varð skipað á stovuni, har ávísa barnið hoyrdi til, og dagstovninum hesar báðar dagarnar, har stovnurin var raktur av sjúku og sjúkramelding. Í álitinum var útinnandi fyrisiting ikki beinleiðis umrødd, men metast má, at sýtanin av ansing í tveir dagar var útinnandi fyrisiting, tí tað ikki var ein avgerð, sum ásetti rættarstøðuna hjá barninum.

Í serstøku viðmerkingunum til § 2 í lógaruppskotinum er eisini ásett, at fyrisitingarlógin ikki er galdandi fyri útinnandi fyrisiting. Landsstýrið kann tó, sambært § 2, stk. 4 í fyrisitingarlógini, áseta annað. Útinnandi fyrisiting gevur sostatt heldur ikki partsrættindi eftir kapitlunum 4-7 í fyrisitingarlógini.

## Undantøk til avgerðarhugtakið

Í ávísum førum eru undantøk til vanliga avgerðarhugtakið, har ein støðutakan, sum vanliga ikki er ein avgerð, verður mett sum ein avgerð, og sum hevur við sær, at partsrættindini í kapitlunum 4-7 í fyrisitingarlógini eru galdandi.

Niðanfyri verða undantøkini umrødd hvør sær:

*Starvsfólkafyrisiting í almennum størvum*
Tá fólk verða sett í starv í almennu fyrisitingini, er talan av røttum um eina avtalu millum arbeiðsgevara og starvsfólk. Tó so, verður slík avtala mett sum ein avgerð og er sostatt eitt undantak til vanliga avgerðarhugtakið.

Ávaringar, umsóknir um farloyvi og uppsagnir eru somuleiðis avgerðir, og eru reglurnar um partsrættindi í kapitlunum 4-7 í fyrisitingarlógini sostatt galdandi.

Í LUM 21/23892 snúði klagan seg um málsviðgerðina hjá Uttanríkis- og mentamálaráðnum í sambandi við setan av nýggjum skúlastjóra í einum skúla. Landsstýrismaðurin hevði ikki givið klagara nøktandi grundgeving fyri, hví viðkomandi ikki varð settur í starv. Grundgeving er partsrættindi, sambært §§ 21 – 23 í kapitli 6 í fyrisitingarlógini, og eru tað vanliga bert avgerðir, ið geva partsrættindi. Málið er eitt dømi um, at støðutakanin til setan av skúlastjóra var ein fyrisitingarlig avgerð.

Í LUM 23/10909 varð klagað til Løgtingsins umboðsmann um avgerðina hjá eini kommunu at geva einum starvsfólki eina ávaring. Umboðsmaðurin tók málið til viðgerðar og heitti á kommununa um at endurskoða avgerðina. Málið er eitt dømi um, at tað er ein fyrisitingarlig avgerð, tá almennur stovnur gevur einum alment settum starvsfólki eina ávaring.

Í LUM 21/14842 varð millum annað klagað um málsviðgerðina hjá eini kommunu í sambandi við, at kommunan sýtti klagara farloyvi. Avgerðin hjá kommununi um at sýta fyri at ganga umbønini um farloyvi á møti var ein fyrisitingarlig avgerð.

Í LUM 16/00017 klagaði eitt fakfelag til umboðsmannin í sambandi við, at Mentamálaráðið hevði sagt skúlaleiðaran í einum skúla úr starvi. Í álitinum til Mentamálaráðið sæst, at uppsøgnin av skúlaleiðaranum var ein fyrisitingarlig avgerð.

Tað at geva starvsfólki tænastuboð, t. e. millum annað, tá starvsfólk fær áheitan um, hvussu ein uppgáva skal loysast, er ikki ein fyrisitingarlig avgerð, men ein innanhýsis fyriskipan, sí Forvaltningsret, s. 45.

*Lógarásettur kærumøguleiki*
Eitt annað undantak til avgerðarhugtakið er, tá talan av røttum er um eina ávegisniðurstøðu, men har ein lógarásettur kærumøguleiki fyri ávegisniðurstøðuni hevur við sær, at ávegisniðurstøðan verður mett sum ein fyrisitingarlig avgerð.

Eitt nú er niðurstøðan hjá einum myndugleika um, hvørt ein umsøkjari kann fáa partsinnlit, sambært § 9, stk. 1 í fyrisitingarlógini, av røttum ein ávegisniðurstøða. Grundað á lógarásetta kærumøguleikan, sambært § 16, stk. 4 í fyrisitingarlógini, verður niðurstøðan tó mett sum ein fyrisitingarlig avgerð.

*Serliga tyngjandi viðurskifti*
Tá talan er um ávegisniðurstøðu ella útinnandi fyrisiting, sum vanliga ikki eru avgerðir, men sum eru serliga tyngjandi fyri borgaran, verður niðurstøðan vanliga mett sum ein avgerð.

Tey atlit, ið eru avgerandi fyri, hvørt ein ávegisniðurstøða eigur at verða mett sum ein fyrisitingarlig avgerð, eru ymisk, men avgerandi fyri tey øll er, at støðutakanin skal vera serliga tyngjandi fyri borgaran. Til dømis verður niðurstøða um at sýta uppafturtøku av einum máli mett sum ein avgerð, sí Forvaltningsret, s. 48-49.

Undantøk, har ávegisniðurstøður verða mettar sum avgerðir, verða tó sjáldan nýtt, og hevur ikki verið gjørligt at funnið nakað ítøkiligt dømi frá umboðsmanninum.

Í greinini "Afgørelsesbegrebet", sum er at finna á heimasíðuni hjá danska umboðsmanninum, stendur, at tá ivamál er um, hvørt talan er um eina fyrisitingarliga avgerð ella útinnandi fyrisiting, hevur tað týdning fyri metingina, hvussu inntrívandi støðutakanin er fyri borgaran, og hvønn tørv borgarin hevur á at vera fevndur av partsrættindum í fyrisitingarlógini.

Niðurstøðan um at geva einum borgara eitt pláss á einum røktarheimi, er ein fyrisitingarlig avgerð, men niðurstøðan um, hvat kamar, viðkomandi fær tillutað, er útinnandi fyrisiting. Burturvísing av einum næmingi úr einum skúla er ein avgerð, men burturvísing úr undirvísingartímanum er útinnandi fyrisiting, sí Forvaltningsret, s. 34.

Í FOB 2015-19, har klagan snúði seg um, at ein skúli, orsakað av ítøkiligum hendingum á skúlanum, avgjørdi at flyta ein næming á annan skúla, segði danski umboðsmaðurin somuleiðis, at talan var um eina fyrisitingarliga avgerð. Talan var somuleiðis um serliga tyngjandi viðurskifti.



# 9 Vitanarsavnið á heimasíðuni hjá umboðsmanninum

Í savninum á heimasíðuni www.lum.fo síggjast allar almennar niðurstøður, kanningar, eftirlitsvitjanir, greinar og ársfrágreiðingar.

Tilfarið er flokkað eftir málsøki, evni og árstali. Eisini ber til at leita við fríteksti.

Umboðsmaðurin vónar við hesum savni at gera tað lættari og meira atkomuligt hjá eitt nú lesandi, starvsfólki innan fyrisitingina og øðrum áhugaðum at finna ta vitan, tey sóknast eftir.





# 10 Løgtingslóg nr. 60 frá 10. mai 2000 um Løgtingsins umboðsmann

**1. Partur**

**Umboðsmaðurin og Løgtingið**
**§ 1**. Løgtingið velur ein uttantingsmann fyri eitt 5 ára skeið at hava innlit við fyrisiting heimastýrisins.
*2. stk*. Doyr umboðsmaðurin í embætistíð síni ella er hann av øðrum orsøkum ikki førur fyri at røkja starv sítt, ger formansskapur Løgtingsins av, hvør skal røkja starvið, til Løgtingið velur ein nýggjan umboðsmann. Tað sama er galdandi, um umboðsmaðurin biður um at verða loystur úr starvi, ella um Løgtingið loysir hann úr starvi smb. stk. 3.
*3. stk*. Hevur Løgtingið ikki longur álit á umboðsmanninum, kunnu tveir triðingar av løgtingsmonnunum loysa hendan úr starvi.

**§ 2**. Umboðsmaðurin, ið ikki kann sita á Løgtingi ella í kommunustýri, skal so vítt gjørligt hava løgfrøðiliga útbúgving.

**§ 3**. Við løgtingslóg kunnu verða gjørdar almennar reglur fyri virksemi umboðsmansins. Annars er umboðsmaðurin í starvi sínum óheftur av Løgtinginum.

**2. Partur**

**Heimildir**
**§ 4**. Virksemið umboðsmansins fevnir um alla fyrisiting heimastýrisins (t.e. lands- og kommunalu), og viðurskifti hjá børnum á privatum stovnum v.m., hvørs uppgávur beinleiðis viðvíkja børnum.
*2. stk*. Lógin er eisini galdandi fyri feløg, stovnar, felagsskapir v.m., ið verða roknað við til almennu fyrisitingina sambært fyrisitingarlógini, lógini um alment innlit ella lógini um viðgerð av persónsupplýsingum.
*3. stk*. Í meting sínari av kommunalari umsiting skal umboðsmaðurin vísa atlit til tær serligu umstøður, kommunufyrisiting virkar undir.
*4. stk*. Interkommunalir felagsskapir eru undirlagdir virksemi umboðsmansins.
*5. stk*. Virksemi umboðsmansins fevnir ikki um ríkismyndugleikar, Løgtingið og stovnar undir Løgtinginum.

**§ 5**. Umboðsmaðurin hevur eftirlit við, at tær í § 4 nevndu umsitingareindir ikki gera mistøk ella vanrøkja skyldur sínar, og at almenna umsitingin ikki fremur órætt móti einstaka borgaranum.

## 3. Partur

### Kærumál og egin mál

**§ 6**. Ein og hvør kann senda umboðsmanninum klagu um tær í § 4 nevndu umsitingareindir.
*2. stk*. Tann, ið klagar, skal navngeva seg í klaguni. Klagan skal vera umboðsmanninum í hendi í seinasta lagi eitt ár eftir, at tey viðurskifti, ið klagað verður um, áttu sær stað.
*3. stk*. Klaga um avgerðir, ið møguligur hægri umsitingarmyndugleiki kann broyta, kann ikki sendast umboðsmanninum, fyrr enn viðkomandi hægri myndugleiki hevur tikið avgerð í málinum. Freistin, ið er nevnd í 2. stk., skal í slíkum førum roknast frá tí degi, hægri myndugleikin tekur avgerð sína.
*4. stk*. Umboðsmaðurin tekur støðu til, um grundarlag er fyri víðari kanningum í máli, ið klagað verður um.
*5. stk*.Umboðsmaðurin kann sjálvur taka eitt mál til viðgerðar og fremja neyðugar kanningar í hesum sambandi.
*6. stk*. Umboðsmaðurin kann kanna viðgerðina hjá myndugleikunum av útvaldum málum.
*7. stk*. Umboðsmaðurin kann kanna allar stovnar, myndugleikar og tænastustøð, sum eru fevnd av virkisøkinum hjá umboðsmanninum.

## 4. Partur

### Kanningar

**§ 7.** Ger umboðsmaðurin av at taka eina klagu til viðgerðar, skal hann beinanvegin kunna viðkomandi umsiting um innihaldið í klaguni, um ikki vandi er fyri, at hetta kann darva kanningini. Harumframt skal umsitingin biðjast um ummæli í málinum, áðrenn umboðsmaðurin tekur avgerð um at gera vart við meting sína av málinum smb. § 10, stk. 2. Umboðsmaðurin kann áseta tíðarfreist til ummæli.

**§ 8.** Tær í § 4 nevndu umsitingar hava skyldu at geva umboðsmanninum tær upplýsingar og at leggja fram øll tey skjøl, sum hesin embætis vegna krevur at fáa fyrilagt.
*2. stk*. Umboðsmaðurin kann stevna fólki í rættin at vitna um viðurskifti, ið eru avgerandi í kanningararbeiðinum. Í slíkum førum eru reglurnar í rættargangslógini galdandi. Rættarfundirnir eru ikki almennir. Tann, ið klagan viðvíkur, hevur saman við hjáseta rætt at vera hjástaddur, meðan slík vitnisførsla fer fram.
*3. stk*. Umboðsmaðurin hevur rætt til at vitja støð, ið kannað verða, og hann hevur fría atgongd til at gera kanningar í øllum neyðugum hølum.
*4. stk*. Metir umboðsmaðurin tað vera neyðugt, kann hann uttan rættarúrskurð kanna privatar stovnar v.m., hvørs uppgávur beinleiðis viðvíkja børnum, sbrt. § 4, stk. 1.

**§ 9.** Umboðsmaðurin hevur tagnarskyldu um tey viðurskifti, hann í virksemi sínum fær kunnleika til. Tagnarskyldan stendur við, eftir at umboðsmaðurin fer úr starvi, og fevnir eisini um starvsfólk á umboðsmansstovninum.

## 5. Partur

### Niðurstøður

**§ 10.** Kemur umboðsmaðurin til ta niðurstøðu, at álvarsligt mistak ella vansketni er framt av einum av teimum í § 4 nevndu umsitingum, skal umboðsmaðurin boða formansskapi Løgtingsins, løgmanni og viðkomandi landsstýrismanni og /ella kommunustýri frá hesum og koma við tilmæli til teirra.
*2. stk.* Umboðsmaðurin hevur rætt til alment at finnast at, koma við tilmælum, og á annan hátt gera vart við meting sína av máli, hann hevur kannað.
*3. stk.* Umboðsmaðurin kann mæla viðkomandi myndugleikum til, at fríur rættargangur verður givin, smb. rættargangslógini §§ 330 –336c, í málum, sum hava verið viðgjørd eftir hesi lóg.

**§ 11.** Umboðsmaðurin letur Løgtinginum ársfrágreiðing um arbeiðið sítt. Frágreiðingin verður almannakunngjørd áðrenn 1. juli.
*2. stk.* Boðar umboðsmaðurin Løgtinginum, landstýrismanni ella kommunustýri frá einum máli, ella tekur hann eitt mál við í ársfrágreiðing sína, skal hann upplýsa um, hvat viðkomandi hevur ført fram til verju sína.

**§ 12.** Rakar umboðsmaðurin við lýti í galdandi lógum, fyriskipanum ella umsitingarligum avgerðum, skal umboðsmaðurin boða Løgtingi og viðkomandi landsstýrismanni frá hesum. Er talan um viðurskifti, ið viðvíkja kommunalari ella interkommunalari umsiting, skal umboðsmaðurin eisini boða viðkomandi kommunustýri frá.
*2. stk.* Umboðsmaðurin hevur eftirlit við, um galdandi lógir og fyrisitingarligar ásetingar eru sambæriligar við altjóða skyldur at tryggja barnarættindi, herundir sáttmála Sameindu Tjóða um rættindi hjá børnum. Rakar umboðsmaðurin við lýti í hesum sambandi, skal umboðsmaðurin boða Løgtingi og viðkomandi landsstýrismanni frá hesum. Er talan um lýti í ásetingum, ásettar av eini kommunu, skal umboðsmaðurin boða viðkomandi kommunustýri frá.

**§ 13.** Um umboðsmaðurin krevur tað, kunnu dómstólarnir vísa frá sær privatmál móti umboðsmanninum vegna avgerðir, sum hann tekur við grundarlagið í hesi lóg.

## 6. Partur

### Lønar- og eftirlønarviðurskifti

**§ 14.** Lønarviðurskifti umboðsmansins, herundir eisini spurningin um eftirløn og bíðipening, verða ásett við løgtingslóg.
*2. stk.* Umboðsmaðurin kann ikki, uttan við loyvi Løgtingsins, vera í starvi hjá almennum ella privatum fyritøkum, virkjum ella stovnum.
*3. stk.* Møguligur spurningur um ógegni umboðsmansins í ávísari søk verður lagdur fyri formansskap Løgtingsins, sum, um mett verður, at talan er um ógegnið, útnevnir annan at viðgera hetta ávísa mál.

**§ 15.** Umboðsmaðurin kann krevja at verða loystur úr starvi við seks mánaða freist at galda frá seinasta degi í einum mánaði.

## 7. Partur

**Fyrisiting**
**§ 16.** Umboðsmaðurin setir og loysir úr starvi starvsfólk síni.

**§ 17.** Tær útreiðslur, ið standast av umboðsmansstovninum, verða játtaðar á Løgtingsins fíggjarlóg.
*2. stk.* Umboðsmaðurin ger roknskap fyri virksemi stovnsins, hesin skal vera grannskoðaður av grannskoðara Løgtingsins.

## 8. Partur

**Ígildisreglur**
**§ 18**. Henda lóg kemur í gildi 1. januar ár 2001.
*2. stk.* Klagur um viðurskifti í tíðarskeiðinum 1. januar 2000 og til henda lóg kemur í gildi, kunnu kortini leggjast fyri umboðsmannin til viðgerðar.

# 11 Yvirlit yvir endaliga viðgjørdar klagur og kanningar í 2023, har álit og skriv vórðu almannakunngjørd

Málini kunnu lesast á **www.lum.fo**

| Dagfesting | Málsnr. | Heiti á málinum á heimasíðuni |
|---|---|---|
| 07-02-2023 | 22/22424 | Álit um fyrisitingarligu mannagongdina tá Etiska ráðið var sett í 2022 |
| 07-02-2023 | 22/13344 | Álit um vantandi svar frá Arbeiðs- og brunaeftirlitinum í sambandi við eina arbeiðsvanlukku |
| 01-03-2023 | 22/16566 | Álit um málsviðgerðina hjá Strandfaraskip Landsins av einari umbøn um alment innlit |
| 08-03-2023 | 22/10345 | Álit um viðgerðina hjá Tórshavnar kommunu og Umhvørvismálaráðnum av broytingum í byggisamtyktini fyri Velbastað |
| 30-03-2023 | 22/12208 | Kanning av eftirlitsvitjanum hjá barnaverndartænastunum |
| 01-05-2023 | 22/20549 | Skriv til Almannamálaráðið um vantandi eftirlit við eldraøkinum |
| 08-05-2023 | 22/15694 | Álit um málsviðgerðina hjá Yrkisdeplinum í sambandi við eina førleikameting |
| 08-06-2023 | 22/21174 | Skriv til Barna- og útbúgvingarmálaráðið um grundgeving ísv. setan av skúlastjóra í Vestmanna skúla |
| 04-07-2023 | 23/12333 | Álit um at Uttanríkis- og vinnumálaráðið ikki vildi geva fult innlit í frágreiðingina um viðurskiftini við Russland |
| 05-07-2023 | 22/22596 | Skriv um undirvísingina av einum næmingi í Skúlanum á Trøðni |
| 21-08-2023 | 23/10394 | Álit um vantandi svar frá Runavíkar kommunu til umsókn um byggiloyvi |
| 24-08-2023 | 23/07506 | Álit um málsviðgerðina hjá Eiðis kommunu og Umhvørvisstovuni í sambandi við eitt mál um plastdálking á Eiði |
| 29-08-2023 | 23/05988 | Skriv til Barna- og útbúgvingarmálaráðið um upplatingartíðir hjá frítíðarheimum |
| 01-09-2023 | 23/14461 | Skriv um málsviðgerðina hjá Runavíkar kommunu av eini innlitsumbøn |
| 12-09-2023 | 23/13716 | Skriv um málsviðgerðina hjá Runavíkar kommunu av eini innlitsumbøn |
| 11-10-2023 | 23/10909 | Álit um avgerð hjá Tórshavnar kommunu um at geva einum starvsfólki eina ávaring |
| 25-10-2023 | 23/13510 | Álit um handfaringina hjá Runavíkar kommunu av einum fyrispurningi um eitt byggimál |
| 02-11-2023 | 23/07090 | Frágreiðing um viðgerð av málum um alment innlit í størru kommununum |
| 29-11-2023 | 23/05602 | Álit um vørugjaldið, ið Tórshavnar havn krevur í sambandi við innflyting av ammoniumnitrati |
| 06-12-2023 | 23/18452 | Skriv til Heilsumálaráðið um klagu frá KVF um vantandi innlit í eina átalu og grundarlagið fyri átaluni |

LØGTINGSINS UMBOÐSMAÐUR, UNDIR BRYGGJUBAKKA 11, POSTMOGA 2008, FO-110 TÓRSHAVN